Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Løgtingið

Dagfesting: 5. mars 2021
Málsviðgjørt: MR/ABD

Uppskot til

Løgtingslóg
um
økisnøvn á internetinum
(Netøkisnavnalógin)

Kapittul 1
Endamál og nýtsluøki

§ 1. Endamál løgtingslógarinnar er at skipa karmarnar fyri atgongd, nýtslu og umsiting av økisnøvnum, sum eru tillutað Føroyum ella økisnøvnum, sum á annan hátt eru knýtt at Føroyum.

§ 2. Løgtingslógin er galdandi fyri økisnavnið .fo, og fyri onnur økisnøvn, sum verða tillutað, ella á annan hátt eru knýtt at Føroyum.

Kapittul 2
Útboð og leingjan

§ 3. Landsstýrismaðurin kann taka avgerð um, at rættindini til at umsita eitt ella fleiri økisnøvn, sum eru tillutað Føroyum, verða boðin út, ella at eitt verandi loyvi til at umsita eitt ella fleiri økisnøvn verður longt.

Stk. 2. Tekur landsstýrismaðurin avgerð um at bjóða út sambært stk. 1, ásetur landsstýrismaðurin nærri reglur um:

1) hvørji økisnøvn eru fevnd av útboðnum,
2) loyvistíðarskeiðið og leingjan av verandi loyvi,
3) treytir, sum dentur skal leggjast á, tá mett verður um innkomin tilboð, og
4) ta støðu, at tikið ikki verður av nøkrum tilboði, heruppií at ábyrgdin av umsitingini verður løgd til Fjarskiftiseftirlitið, inntil ein umsitari verður útnevndur, ella at økisnavnið ikki skal nýtast.

Stk. 3. Verður verandi loyvi longt sambært stk. 1, kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur og treytir í sambandi við leingjan av loyvinum.

§ 4. Um avgerð verður tikin um at bjóða út eftir § 3, stk. 1, ásetur Fjarskiftiseftirlitið nærri reglur um fremjan av útboðnum. Reglurnar kunnu fevna um útboðstilfar, fyritreytir fyri luttøku í útboðnum, endurgjald og revsing fyri brot á reglur fyri útboðnum, heruppií burturvísing frá útboðnum, o.a. Eisini kann Fjarskiftiseftirlitið áseta, at luttakararnir bera útreiðslurnar av, at útboðið verður fyrireikað.
Stk. 2. Fjarskiftiseftirlitið útnevnir vinnaran av útboðnum, og gevur út loyvi til at umsita økisnavnið, sum útboðið fevnir um.
Stk. 3. Fjarskiftiseftirlitið ásetur loyvistreytirnar samsvarandi tí givna tilboðnum.

§ 5. Um Fjarskiftiseftirlitið yvirtekur umsitingina orsakað av reglum, ásettar við heimild í § 3, stk. 2, nr. 4, afturtøku av loyvinum sambært § 22, stk. 1, ella tí umsitari letur loyvið inn aftur, eru § 6, stk. 1 og 2, § 7, § 10, stk. 5 og § 18 ikki galdandi fyri umsitingina hjá Fjarskiftiseftirlitinum.
Stk. 2. Um Fjarskiftiseftirlitið fyribils yvirtekur umsitingina sambært § 3, stk. 2, nr. 4 ella § 22, stk. 2 krevur Fjarskiftiseftirlitið gjald frá skrásettum fyri útreiðslurnar av umsitingini eftir somu reglum og meginreglum sum umsitari.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um gjald sambært stk. 2.

Kapittul 3
Skyldur hjá umsitara

§ 6. Umsitari skal hava breiða umboðan av luttakarum úr føroyska internet samfelagnum, heruppií umboð fyri privatar brúkarar, professjonellar brúkarar og veitarar. Samanumtikið skal umsitari hava hóskandi førleikar til at umsita økisnavnið sambært hesi løgtingslóg.
Stk. 2. Virksemið hjá umsitara kann ikki útinnast við vinningi fyri eyga, og umsitari skal vera kostnaðartilvitaður í síni umsiting.
Stk. 3. Umsitari skal í mest møguligan mun tryggja, at økisnavnið verður umsitið til gagns fyri vinnuna, tað almenna og einstaklingar.
Stk. 4. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um umsitingina av einum ávísum ella av fleiri økisnøvnum.

§ 7. Umsitari ger viðtøkur fyri virksemið.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin skal góðkenna viðtøkurnar og broytingar í viðtøkunum sambært stk. 1.
Stk. 3. Í seinasta lagi 5 mánaðir eftir, at roknskaparárið er endað, letur umsitari landsstýrismanninum ein grannskoðaðan ársroknskap við frágreiðing um virksemið í farna árinum. Landsstýrismaðurin kann biðja um útgreiningar í sambandi við roknskaparuppsetanina.
Stk. 4. Umsitari almannakunngerð grannskoðaðu ársfrásøgnina.

§ 8. Umsitari skal áseta handilstreytir fyri økisnøvn, sum viðkomandi umsitur. Handilstreytirnar kunnu fevna um:
1) brúksskyldu,
2) skráseting og nýtslu av økisnøvnum, og
3) striking av einum skrásettum økisnavni.

Stk. 2. Umsitari tekur avgerð um, hvørt handilstreytirnar sambært stk. 1 eru yvirhildnar.
Stk. 3. Handilstreytirnar sambært stk. 1 mugu ikki stríða ímóti góðum økisnavnasiði.
Stk. 4. Umsitari skal tryggja gjøgnumskygni í umsitingini, heruppií at handilstreytir o.a., sum hevur týdning fyri skráseting og nýtslu av økisnøvnum, eru atkomulig fyri almenningin á heimasíðu umsitarans.
Stk. 5. Umsitari skal kunna alment um týðandi broytingar í handilstreytunum og um onnur viðurskifti, sum hava týdning fyri skráseting og nýtslu av økisnøvnum, áðrenn hesi koma í gildi.

§ 9. Umsitari skal stovna og dagføra dátugrunn við upplýsingum um skrásetarar av økisnøvnum.
Stk. 2. Upplýsingar, sum verða skrásettar, eru navn, teldupostur, bústaður og telefonnummar. Umsitari kann í handilstreytunum áseta krav um aðrar neyðugar upplýsingar.
Stk. 3. Umsitari skal á heimasíðu síni veita upplýsingar um skrásetingardag, útgongudag og seinastu dagføring.
Stk. 4. Eftir áheitan frá skrásetara skal umsitari tryggja, at upplýsingar sambært stk. 1 ikki verða alment atkomuligar, um upplýsingarnar sambært aðrari lóggávu eru undantiknar frá almannakunngerð, og umsitari ikki av egnum ávum kann staðfesta hetta við at sláa tað upp í einari almennari skrá. Upplýsingarnar kunnu tó latast víðari, um hetta er krav sambært aðrari lóggávu.

§ 10. Umsitari skal tryggja støðugan, tryggan og óslitnan rakstur av økisnøvnunum, sum umsitari hevur ábyrgd av.
Stk. 2. Umsitari skal hava og viðlíkahalda trygdarpolitikk fyri økið.
Stk. 3. Umsitari skal gera avtalur við triðjapartar um:
1) kt-grannskoðan, og
2) varðveitslu av øllum dátum fyri .fo økið og møgulig onnur økisnøvn.

Stk. 4. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um innihaldið í trygdarpolitikkinum, heruppií trygdarkrøv og trygdarstandardar, krøv til kt-grannskoðan, krøv um at ávísar skráir bert mugu goymast í einum góðkendum landi o.a.
Stk. 5. Umsitari skal senda Fjarskiftiseftirlitinum avrit av avtalunum um varðveitslu og kt-grannskoðan.

§ 11. Umsitari kann útveita alla ella partar av umsitingini, undir hesum tøkniliga raksturin, til ein ella fleiri undirveitarar.
Stk. 2. Umsitari skal tryggja, at umsitingin, sum sambært stk. 1 er latin øðrum, er sambært ásetingunum í hesi løgtingslóg og reglum, ásettar við heimild í løgtingslógini.

§ 12. Umsitari kann útveita alla ella partar av skrásetingarmannagongdini til ein triðjapart.
Stk. 2. Umsitari skal almannakunngera, hvør er góðkendur at skráseta økisnøvn.
Stk. 3. Umsitari kann áseta handilstreytir og treytir fyri tann, ið tekur sær av at skráseta økisnøvn.

Kapittul 4
Skráseting og nýtsla av økisnøvnum

§ 13. Skrásetarar mugu ikki skráseta og nýta økisnøvn í ósamsvari við góðan økisnavnasið.
Stk. 2. Skrásetarar mugu ikki skráseta og varðveita skrásetingar av økisnøvnum bert við víðarisølu ella útleigan fyri eyga.

Kapittul 5
Útskifting av umsitara

§ 14. Umsitari skal tryggja, at umsitingin í í mest møguligan mun kann halda fram sum higartil í sambandi við, at umsitingin av einum økisnavni verður latin einum nýggjum umsitara.
Stk. 2. Umsitari skal kostnaðarfrítt geva nýggjum umsitara allar upplýsingar um verandi avtalur við skrásetarar og aðrar upplýsingar, sum eru viðkomandi til tess at yvirtaka og reka virksemið víðari.
Stk. 3. Kemur umsitari undir trotabúsviðgerð verða verandi avtalur við skrásetarar latnar tí nýggja umsitaranum.
Stk. 4. Ein nýggjur umsitari gerst partur í teimum avtalum, sum fyrrverandi umsitari hevur gjørt við skrásetarar av økisnøvnum við virknaði frá yvirtøkutíðspunktinum, ið er ásett í loyvinum, sum verður givið sambært § 4, stk. 2, eftir avgerð sambært § 22, stk. 2 ella eftir reglum, ásettar við heimild í § 3, stk. 2, nr. 4. Tann fyrrverandi umsitarin verður leysur av sínum skyldum sambært hesum avtalum frá yvirtøkutíðspunktinum.

§ 15. Handilstreytirnar hjá einum nýggjum umsitara koma í gildi á yvirtøkudegnum uttan nakra fráboðan frammanundan.

§ 16. Heldur umsitari uppat, verður virksemið avtikið sambært ásetingunum í viðtøkunum, sbr. § 7, stk. 1.

Kapittul 6
Økisnøvn, sum á annan hátt eru knýtt at Føroyum

§ 17. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um tilgongdina o.a. í sambandi við at søkt verður um økisnavn, sum á annan hátt er knýtt at Føroyum, og áseta reglur og treytir fyri hesi økisnøvn.

Kapittul 7
Eftirlit, upplýsingar og elektroniskt samskifti

§ 18. Fjarskiftiseftirlitið hevur eftirlit við, at løgtingslógin og reglur, ásettar við heimild í løgtingslógini, umframt treytir, ásettar í loyvum, ið eru givin sambært løgtingslógini, verða yvirhildnar.
Stk. 2. Fjarskiftiseftirlitið kann geva umsitara boð um at halda ásetingarnar og treytirnar, sum eru nevndar í stk. 1.
Stk. 3. Fjarskiftiseftirlitið kann krevja allar upplýsingar og tilfar frá umsitara, heruppií útgreiningar í sambandi við roknskaparuppsetanina, uppgerð av marknaðarpørtum, nettosølu, gjaldsfreistir o.a., um tað verður mett viðkomandi í sambandi við umsiting og eftirlit sambært løgtingslógini.
Stk. 4. Um ósemja ella ivamál er um, hvørjar avtalur og upplýsingar eru viðkomandi eftir § 14, stk. 2, kann Fjarskiftiseftirlitið taka avgerð í málinum.

§ 19. Umsitarar, sum hava fingið loyvi sambært § 3, stk. 1 ella § 4, stk. 2 í hesi løgtingslóg, bera útreiðslurnar hjá Fjarskiftiseftirlitinum av uppgávum sambært løgtingslógini.
Stk. 2. Eru fleiri umsitarar, verða útreiðslur Fjarskiftiseftirlitsins sambært stk. 1 býttar millum umsitararnar, í mun til teirra marknaðarpart álmanakkaárið frammanundan, av nettosøluni, ið er treytað av loyvinum sambært § 3, stk. 1.

§ 20. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at skrivligt samskifti til og frá myndugleikum um viðurskifti, sum eru fevnd av løgtingslógini ella reglum, settar í gildi við heimild í løgtingslógini, skal fara fram elektroniskt, og kann áseta reglur um, at trygt elektroniskt samskifti skal nýtast.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um elektroniskt samskifti, heruppií um nýtslu av ávísum kt-skipanum, serstøk snið og talgilda undirskrift o.a.
Stk. 3. Eini elektronisk boð verða mett at vera komin fram, tá tey eru atkomulig fyri móttakaran av boðunum.

Kapittul 8
Tvingsilsbøtur og afturtøka av loyvum

§ 21. Fjarskiftiseftirlitið kann áleggja tvingsilsbøtur, um umsitari ikki fremur gerðir ella undanlát sambært §§ 9 og 10 og § 14, stk. 1 og 2, sum áliggja umsitara.

§ 22. Fjarskiftiseftirlitið kann taka aftur eitt loyvi, um umsitari grovliga ella ferð eftir ferð fremur brot á løgtingslógina, á reglur, settar í gildi við heimild í løgtingslógini, ella treytir í einum loyvi, sum er givið sambært løgtingslógini, ella virksemi hjá umsitara av øðrum orsøkum heldur uppat í loyvistíðini.
Stk. 2. Um Fjarskiftiseftirlitið tekur aftur eitt loyvi, sambært stk. 1, tekur landsstýrismaðurin avgerð um, hvørt eitt útboð skal vera fyri viðkomandi økisnavn, sambært § 3, og um Fjarskiftiseftirlitið fyribils skal taka á seg umsitingina, inntil ein nýggjur umsitari er útnevndur, sambært § 4, stk. 2.

Kapittul 9
Kæra

§ 23. Avgerðir hjá Fjarskiftiseftirlitinum eftir hesi løgtingslóg kunnu innan 4 vikur kærast til landsstýrismannin.
Stk. 2. Avgerðir tiknar sambært §§ 3 og 4 og reglum, ásettar við heimild í hesum ásetingum, og sambært § 18, stk. 4, kunnu ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

Kapittul 10
Gildiskoma og skiftisreglur

§ 24. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2021.

Stk. 2. Henda løgtingslóg, umframt handilstreytir og aðrar treytir sambært § 8, eru eisini galdandi fyri skrásetingar av økisnøvnum, sum eru gjørdar, áðrenn løgtingslógin kom í gildi.
Stk. 3. Uttan mun til stk. 1 og 2 fær § 13, stk. 2 ikki gildi fyrr enn tann 1. juli 2026 fyri økisnøvn, sum vóru skrásett, tá løgtingslógin kom í gildi.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Internetøkisnøvn eru at meta sum eitt tilfeingi, ið hevur avgerandi týdning fyri kritiska undirstøðukervið (infrastrukturin) í Føroyum.

Seinastu árini hevur tøkniliga menningin á økinum tikið dik á seg og onnur lond, sum t.d. Danmark, Norra og Ísland, hava í hesum sambandi skipað internetøkisnøvn við lóg.

Skipanin við internetøkisnøvnum, sum hevur verið galdandi í Føroyum síðani 2001, er ikki skipað við lóggávu. Internetøkisnøvnini hava verið umsitin eftir privatrættarligum treytum í einari sokallaðari sjálvreguleringsskipan, sum umboð fyri føroyska internetsamfelagið eftir avtalu við avvarðandi landsstýrismann hava tikið sær av.

Av tí, at tøkniliga menningin á økinum, internetið og nýtslan av økisnøvnum hevur verið støðugt vaksandi og hevur alsamt øktan týdning fyri einstaklingin, vinnuna, almennar myndugleikar og samfelagsbúskapin í síni heild, er neyðugt at ganga somu leið sum okkara grannalond og skipa økið við lóg.

Hóast umsitingin av føroyskum internetøkisnøvnum ikki hevur verið skipað við lóg, so hevur umsitingin í høvuðsheitum virkað væl higartil. Mett verður tó, at tað eru týðandi viðurskifti í galdandi skipan, sum tørvur er á at fáa skipað við lóg.

Galdandi skipan kann tykjast ógreið eitt nú í spurninginum, hvør hevur evstu ábyrgd av økinum og formliga heimild at leggja uppí, um umsitingin av økisnavninum .fo ikki virkar til lítar. Leiklutabýtið millum myndugleika og umsitara av økisnøvnum á internetinum er eftir galdandi skipan heldur ógreitt, og tørvur er á at áseta yvirskipaðar reglur og treytir fyri umsitingina av økisnavninum .fo og møguligum øðrum økisnøvnum, ið verða tillutað Føroyum. Harumframt er tørvur á at fáa greiðar karmar og reglur fyri umsitingina av økisnøvnum, ið tryggja atkomu, gjøgnumskygni og gagnnýtslu av tilfeinginum, undir hesum ásetingar um kt-trygd og eftirlit við umsitingini.

Søguligt baksýni

Yvirskipaða stýringin av landøkjum (.fo, .dk, .uk o.s.fr.) liggur hjá altjóða stovninum ICANN (Internet Corporation for Assigned Names and Numbers). Tá økisnavnið .fo varð skrásett á fyrsta sinni í 1993, kom nýtslurætturin at liggja hjá almennu donsku teldumiðstøðini UNI-C, sum Fróðskaparsetrið og Jarðfrøðisavnið tá høvdu samstarv við um netsamband.

Í 1996 seldi UNI-C ein part av sínum internetvirksemi, undir hesum umsitingina av m.a. økisnavninum .fo, til Tele2, sum stovnaði eitt dótturfelag UNI2 til at reka internettænastur. Fróðskaparsetrið og Jarðfrøðisavnið høvdu upp á skift umboð í UNI2 og hildu, at rættast hevði verið at fingið økið á føroyskar hendur. Umboð fyri Fróðskaparsetrið fingu frá UNI2 at vita, at einki var til hindurs fyri at taka yvir ábyrgd og umsiting av økisnavninum .fo. UNI2 gjørdi tó vart við, at m.a. kommersialiseringin av internetinum hevði við sær, at broytingar á "top-level lagnum" kravdu staðfesting á hægsta politiska stigi. Tí heitti Fróðskaparsetrið á vári í 2000 á Vinnumálaráðið um at seta sjøtul á fyrireikandi arbeiðið til eina føroyska skipan, sum breið semja kundi vera um millum brúkarar og veitarar.

Ein arbeiðsbólkur við umboðum úr Vinnumálaráðnum, Fjarskiftiseftirlitinum, Fróðskaparsetrinum og KT-felagnum læt á heysti í 2000 landsstýrismanninum í vinnumálum eitt tilmæli um umsiting av økisnøvnum. Arbeiðsbólkurin mælti til, at vit í Føroyum skuldu ganga somu leið sum eitt nú grannalondini Danmark, Norra og Ísland, ið høvdu eina sokallaða sjálvreguleringsskipan í sambandi við umsiting av økisnøvnum á internetinum. Tað merkir, at kt-vinnan sjálv í stóran mun stendur fyri umsitingini av økisnøvnum á internetinum, og at umsitingin er skipað í sjálvstøðugum ikki-yvirskotsgevandi (*non-profit*) felagi.

Arbeiðsbólkurin mælti til at skipa eitt FO-ráð, ið skuldi hava hesar uppgávurnar:

- at reka ella útveita FO-hostmasteruppgávuna,
- at áseta reglur fyri skráseting av .fo økisnøvnum,
- at fylgja við og at hava eftirlit við umsitingini av .fo.
- at áseta mannagongdir fyri tillutan av brúkararættindum til økisnøvn undir .fo

Kostnaðurin fyri skrásetingina skuldi ikki vera størri enn umsitingarkostnaðurin, bæði tá talan var um gjald frá nettænastuveitara til fo-vertin, og tá talan var um brúkaragjald fyri økisnavn. Roknskapurin fyri økisnavnaambætaran skuldi ikki vera tengdur at øðrum virksemi og skuldi vera tøkur hjá FO-ráðnum, men skuldu roknskapurin og útrokningin av gjøldunum vera skild frá øðrum virksemi og vera gjøgnumskygt.

Sambært tilmælinum skuldi Vinnumálaráðið samtykkja reglurnar og broytingar í reglunum fyri skráseting av økisnøvnum og samtykkja prísin á økisnøvnum. Harumframt skuldi landsstýrismaðurin í vinnumálum tilnevna limirnar í ráðnum eftir tilmæli frá avvarðandi myndugleikum og feløgum. Arbeiðsbólkurin vísti á, at sum fráleið kundi tað fara at vísa seg neyðugt at lóggeva á økinum.

Í januar í 2001 varð FO-ráðið skipað við tí endamáli at hava um hendi skráseting og umsiting av økisnøvnum á internetinum, sum Føroyar hava nýtslurætt til.

Í oktober í 2001 sendi UNI2 fráboðan til FO-ráðið um, at UNI2 ynskti at verða leyst av umsitingini av økisnavninum .fo frá 1. januar 2002. Avtala varð gjørd við sonevnda DK-hostmaster um fyribils at reka tøkniliga partin av umsitingini til tann 1. januar 2002, tá FO-ráðið eftir ætlan skuldi taka yvir og standa fyri skrásetingini av økisnøvnum og innkrevjing av stovningar- og ársgjaldi.

Sjálvregulering
Í mai 2001 kunnar landsstýrismaðurin ICANN um, at landsstýrismaðurin ætlar at skapa gott grundarlag fyri nýtslu av internetinum og viðurkennur eina skipan við sjálvregulering viðvíkjandi økisnavninum. Landsstýrismaðurin kunnar eisini ICANN um, at føroyska kt-vinnan hevur gjørt ein stovn viðvíkjandi umsiting av økisnavninum, og at landsstýrið ætlar, at hesin stovnur skal umsita FO-økið.

Í januar 2002 samtykti FO-ráðið viðtøkur ráðsins, ið vórðu góðkendar av landsstýrismanninum. Viðtøkurnar kunnu, umframt at vera viðtøkur fyri FO-ráðið, eisini metast sum avtalutreytir millum partarnar, landsstýrismannin og kt-vinnuna, um umsitingina av økisnøvnunum.

Viðtøkur FO-ráðsins

Sambært viðtøkunum er talan um ein sjálvsognarstovn. FO-ráðið hevur 4 limir, ið Vinnumálaráðið velur eftir tilmæli frá KT-felagnum.

Sambært viðtøkunum er endamálið hjá FO-ráðnum:
- at reka, beinleiðis ella óbeinleiðis, umsiting av .fo landøkinum
- at tryggja, at .fo landøkið verður umsitið til gagns fyri vinnu, mentan og einstaklingar
- at hava eftirlit við .fo landøkinum
- at áseta reglur og prísir, tá ið brúksrættindi til økisnøvn í .fo landøkinum verða latin.

FO-ráðið kann sambært viðtøkunum útveita dagliga raksturin. Virksemið hjá ráðnum verður fíggjað við teimum gjøldum, sum verða kravd fyri nýtslu av økisnøvnum í .fo landaøkinum. Roknskapur felagsins verður grannskoðaður av einum løggildum grannskoðara, og verður roknskapurin sendur Vinnumálaráðnum.

FO-ráðið hevur ábyrgdina av umsitingini av økisnavn.fo, men hevur gjørt avtalu við veitara at taka sær av ávísum dagligum umsitingarligum uppgávum fyri ráðið. Handilstreytirnar, sum eru galdandi fyri nýtsluna av tænastunum hjá økisnavn.fo, hevur FO-ráðið ásett. Økisnavn.fo er ein keypsportalur, og eru handilstreytir ásettar fyri keyp, gjald, upplýsingar um skrásetta og tøkniligar upplýsingar o.a. Allar útreiðslur og inntøkur í sambandi við umsitingina av økisnavn.fo liggja hjá FO-ráðnum.

Økisnavnið .fo verður umsitið av vinnuni
Sum lýst frammanfyri, so er økisnavnið .fo eitt øki, sum landið hevur ræði á, og krevst tað longu í dag, at landsstýrið so ella so luttekur í skipanini av umsitingini av økinum. Eisini hevur tað verið eitt ynski frá øllum pørtum, at vinnan umsitur økið, og partarnir tóku tí í felag stig til at skipa stovn, sum skuldi loysa uppgávuna.

Sjálvsognarstovurin FO-ráðið er ikki partur av almennu umsitingini, men er talan um stovn, sum er skipaður á eginrættarligum grundarlagi. FO-ráðið og umsitingin av økisnavn.fo eru ikki skipað í ella sambært lóg, men sambært viðtøkum, sum ráðið sjálvt hevur gjørt.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur góðkent viðtøkurnar, góðkennir valið av limum í nevndina og fær roknskapin hjá ráðnum til kunnleika.

Fíggjarviðurskiftini hjá FO-ráðnum eru heilt atskild frá fíggjarviðurskiftunum hjá landinum. Tað merkir, at raksturin verður ikki fíggjaður við játtan á fíggjarlógini, og verður roknskapurin ikki grannskoðaður sambært reglunum fyri landsins almenna roknskaparhald.

Sambært viðtøkunum ásetur FO-ráðið sjálvt reglur og prísir, tá brúksrættindi til økisnøvn verða latin. Viðurskiftini millum FO-ráðið (sum varðar av umsitingini) og viðskiftafólk, sum keypa sær økisnøvn, eru grundað á sáttmála-/handilsviðurskifti ella eginrættarlig viðurskifti millum tveir partar, ið ikki kunnu kærast til ein hægri fyrisitingarligan myndugleika. FO-ráðið kann sambært viðtøkunum útlisitera raksturin.

Verður FO-ráðið avtikið, skulu ognir ráðsins sambært viðtøkunum nýtast internetinum í Føroyum at gagni.

Umframt viðtøkurnar, sum landsstýrismaðurin hevur góðkent, er eingin almenn regulering viðvíkjandi umsitingini av økisnøvnum.

1.2. Galdandi lóggáva

Umsitingin av økisnavninum .fo er ikki skipað í ella sambært lóg, men sambært viðtøkum fyri FO-ráðið. Nýtslurætturin til økisnavnið .fo er tillutaður Føroyum frá altjóða stovninum ICANN (Internet Corporation for Assigned Names and Numbers). FO-ráðið hevur eftir avtalu við landsstýrismannin ábyrgdina av umsitingini og nýtsluni av føroyskum økisnøvnum á internetinum. FO-ráðið hevur havt umsitingina av økisnøvnum um hendi síðani galdandi skipan varð sett á stovn í 2001.

Onnur lóggáva av týdningi fyri økið

Virksemið hjá FO-ráðnum er fevnt av kappingarlógini og eru m.a. marknaðarføringslógin, vørumerkjalógin og navnalógin galdandi fyri økisnøvn á internetinum. Eitt økisnavn á internetinum kann t.d. ikki verða skrásett í ósamsvari við góðan marknaðarføringssið, sbrt. § 1 í marknaðarføringslógini.

Økisnøvn verða í dag skrásett sambært meginregluni um, at tann, ið er fyrstur at skráseta økisnavnið, hevur rættin til tað. Um ósemja er um eitt økisnavn, má viðkomandi, sum metir seg hava betri rætt til eitt longu skrásett økisnavn, leggja sak fyri dómstólarnar móti viðkomandi, sum er skrásettur fyri økisnavnið, ella sum er skrásetari. FO-ráðið fyriheldur seg til avgerðir frá dómsvaldinum.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Økisnøvn á internetinum eru eitt týðandi samfelagsligt tilfeingi, ið hevur avgerandi týdning fyri kritiska undirstøðukervið (infrastrukturin) í Føroyum. Tí er tað umráðandi, at umsitingin av økisnavninum .fo, verður útint við tí endamáli at tryggja samfelagsgagnsemi fyri borgarar, vinnulív og samfelagsbúskapin í síni heild.

Endamálið við uppskotinum er at fáa skipaðar karmar fyri umsitingina og nýtsluna av økisnøvnum á internetinum. Harumframt greiðar reglur, ið tryggja atkomu, gjøgnumskygni og gagnnýtslu av tilfeinginum, undir hesum ásetingar um kt-trygd og eftirlit við umsitingini av økisnøvnum á internetinum.

Lógin er skipað á tann hátt, at hon sambært ásetingini í § 2 fevnir um økisnavnið .fo og onnur økisnøvn, sum verða tillutað Føroyum ella á annan hátt eru knýtt at Føroyum. Kap. 2-5 í lógini eru galdandi fyri økisnavnið .fo og onnur økisnøvn, sum verða tillutað Føroyum, meðan kap. 6 er galdandi fyri økisnøvn, sum á annan hátt eru knýtt at Føroyum. Kap. 7 er um eftirlit, upplýsingar og elektroniskt samskifti, kap. 8 er um tvingsilsbøtur og afturtøku av loyvum, kap. 9 er um kæru og kap. 10 er um gildiskomu- og skiftisreglur.

Skotið verður upp at seta í gildi eina lóg, sum yvirskipað ásetur ávísar grundleggjandi meginreglur, og sum samstundis tryggjar, at skipanin við sjálvregulering heldur fram.

Hóast eitt endamál við lógini er at tryggja, at tað í minst møguligan mun skal vera lógarregulering á økinum, er tað ein avleiðing av skipanini, har uppgávan at umsita økisnøvn, sum eru tillutað Føroyum, verður útveitt, at tað almenna kann hava eftirlit við, at lóggávan verður yvirhildin, og hevur heimild til at leggja uppí, um umsitari ikki yvirheldur reglur og treytir ella ikki ger eftir boðum.

Í uppskotinum er m.a. ásett, at umsitari av økisnøvnum á internetinum skal tryggja støðugan, tryggan og óslitnan rakstur av økisnøvnunum. Umsitari skal m.a. eisini gera avtalur um kt-

grannskoðan og varðveitslu av øllum dátum fyri økisnøvn.fo og herumframt hava ein trygdarpolitikk fyri økið.

Heimild verður eisini givin landsstýrismanninum ella stovni undir landsstýrismanninum at leggja uppí, um umsitingin av økisnøvnum ikki virkar til lítar.

Endamálið við uppskotinum er harumframt at framtíðartryggja og styrkja umsitingina av økisnavninum .fo.

Sonevnda sjálvreguleringsskipanin, har kt-vinnan sjálv í stóran mun stendur fyri umsitingini av økisnøvnum á internetinum, og har umsitingin er skipað í sjálvstøðugum ikki-yvirskotsgevandi (non-profit) felagi, hevur virkað væl higartil. Tí eru ásetingar gjørdar í lógaruppskotinum, ið tryggja, at galdandi skipan kann halda fram.

Til tess at fáa eina støðuga og framtíðartryggjaða skipan, eru í lógaruppskotinum ávís yvirskipað krøv sett til umsitaran av økisnavninum .fo. Talan er um framhald av krøvunum um, at umsitari skal hava breiða umboðan, skal tryggja gjøgnumskygni, og at virksemið hjá umsitara ikki má fremjast við vinningi ella yvirskoti fyri eyga. Um skipanin við sjálvregulering skal varðveitast, er tað avgerandi at hava mest møguligt gjøgnumskygni í skipanini.

Skotið er upp, at umsitari kann áseta handilstreytir og treytir um eina rød av lutum í umsitingini. Hetta gevur umsitara møguleika fyri, samsvarandi gongdini í brúkaratørvinum og internetinum í breiðum høpi, at menna nýggj amboð innanfyri lógarinnar karmar. Umsitari fær við hesum amboð at kunna tillaga menningina á internetøkinum til gagns fyri borgarar, vinnulív og samfelagið sum heild.

Yvirskipað leggur lógaruppskotið upp til:

- At val av umsitara fyri økisnøvn, sum verða tillutað Føroyum, fer fram aftaná alment útboð.
- At seta yvirskipaðu krøvini til umsitara.
- At hildið verður fram við og tryggjað verður, at sjálvreguleringsskipanin kann halda fram, har umsitari ásetur handilstreytir fyri skrásetarar av økisnøvnum.
- Eina eftirlitsskipan soleiðis, at tryggjað verður, at umsitari yvirheldur krøvini sambært lógini.

Í uppskotinum eru ásettir karmar fyri møgulig onnur økisnøvn enn .fo, sum í framtíðini kunnu verða tillutað Føroyum. Tí er ein heimild ásett til landsstýrismannin at leypandi taka avgerð um, hvørt møgulig onnur økisnøvn skulu umsitast eftir somu reglum.

Eisini vendir uppskotið sær til borgarar, sum skráseta ella ynskja at skráseta eitt økisnavn. At tað nú er ásett ein regla um góðan sið á økinum fyri økisnøvn er nýtt í mun til núgaldandi sjálvreguleringsskipan, sum ikki hevur eina slíka reglu. Harafturat er ásett eitt forboð ímóti at skráseta og varðveita skrásetingar av internetøkisnøvnum bert við tí endamáli at selja víðari ella leiga út.

Gildisøki
Útgangsstøðið við uppskotinum er, at økisnavnið .fo verður umsitið eftir ásetingunum í lógini. Verða onnur økisnøvn tillutað Føroyum í framtíðini, so verða hesi økisnøvn eisini

fevnd av lógini. Eisini eru onnur økisnøvn, sum á annan hátt eru knýtt at Føroyum, fevnd av lógini.

Lógaruppskotið vendir sær til allar skrásetarar undir økisnavninum .fo. Allir skrásetarar verða javnsettir í lógini og hava tískil somu rættarstøðu. Hetta er galdandi, uttan mun til um skrásetingin av einum økisnavni á internetinum er farin fram áðrenn ella aftaná at galdandi skipan varð sett á stovn (1. januar 2001), ella skrásetingin er farin fram eftir, at lógin er sett í gildi.

Yvirskipað lógarkrøv til umsitara av økisnavninum .fo
Ásett er, at umsitingin av økisnøvnum kann verða boðin út. Loyvið verður givið tíðaravmarkað soleiðis, at tað aftur kann verða boðið út, tá loyvistíðin er av. Harvið er møguleiki fyri at skifta umsitara út. Við at hava henda møguleika verður tað tryggjað, at tað í sambandi við útboð verða sett krøv til umsitara, sum eru í samsvari við menningina, sum er á internetøkinum.

Skotið verður upp at áseta greiðar og yvirskipaðar karmar, undir hesum framhald av meginreglunum um gjøgnumskygni, breiða umboðan og non-profit. Umsitari fær víðar heimildir, men krøvini í lógini skulu tryggja gjøgnumskygni og ávirkan frá internet-samfelagnum. Gjøgnumskygni og at brúkararnir hava ávirkan eru fyritreytir fyri, at sjálvreguleringsskipanin kann halda fram.

Gjøgnumskygni
Lógaruppskotið byggir á gjøgnumskygni í umsitingini av økisnavninum .fo og øðrum økjum, sum serliga eru tillutað Føroyum, soleiðis at opinleiki er um, hvussu umsitingin fer fram.

Umsitari (administrator) skal gera viðtøkur fyri sítt virksemi og gera ársfrágreiðing. Gjøgnumskygnið kemur til sjóndar við tað, at umsitari skal almannakunngera handilstreytir og líknandi, sum hevur týdning fyri skráseting og nýtslu av økisnøvnum á internetinum, somuleiðis skal umsitari kunngera týðandi broytingar í handilstreytum og líknandi.

Tað verður tryggjað, at opinleiki er í mun til, hvør stendur aftanfyri eitt økisnavn. Umsitari av .fo økisnavninum skrásetur longu í dag upplýsingar um, hvør skrásetari er. Umsitari skal sambært uppskotinum tryggja, at upplýsingar um skrásetara eru alment atkomuligar, uttan so at skrásetari hevur biðið um, at upplýsingar um navn, bústað og telefonnummar eru loyniligar.

Ikki-yvirskotsgevandi støði (non-profit)
Skotið verður upp at halda fram við meginregluni um, at umsitingin skal útinnast á einum kostnaðargrundaðum og ikki-yvirskotsgevandi støði (non-profit). Samstundis verður krav sett um effektivitet og gjøgnumskygni í fíggjarviðurskiftunum hjá umsitara.
Við at varðveita verandi meginreglu um ikki-yvirskotsgevandi støði (non-profit), fer kostnaðurin hjá skrásetarunum at svara til tað, sum tað væntandi hevði kostað, um uppgávan varð útint í almennum høpi og fíggjað við gjøldum.

Trygd
Eitt annað týðandi atlit er tann víðfevnda rakstrartrygdin. Tað er sostatt ætlanin við uppskotinum at tryggja støðufesti, soleiðis at skipanin kann virka støðugt og effektivt, so brúkararnir kunnu hava álit á skipanini.

Skotið verður upp, at umsitari hevur ábyrgdina av at halda ávíst trygdarstøði. Somuleiðis verður skotið upp, at umsitari millum annað skal tryggja ein støðufastan, tryggan og áhaldandi rakstur av og samband við navnaambætararnar fyri økisnavnið .fo.

Harafturat skal umsitari gera avtalu við triðjapart um varðveitslu av upplýsingum frá navnadátugrunninum og navnaambætaradátugrunninum og senda nevnda triðjaparti avrit av øllum upplýsingunum dagliga. Trygdarreglur í løgtingslóg um nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum, undir hesum serliga § 46 í løgtingslóg, hava gildi saman við hinum reglunum í løgtingslóg um vernd av persónsupplýsingum.

Skotið verður upp, at WHOIS dátugrunnurin bert innsavnar upplýsingar, sum eru neyðugar til tess at skráseta eitt økisnavn.

Umsitingin – tann dagliga, tann tekniska og skrásetingarmannagongdin
Lógaruppskotið gevur umsitara møguleika at útveita partar av uppgávuni at umsita økisnavnið .fo.

Talan kann til dømis vera um útveiting av tekniska rakstrinum ella sjálvum sambandinum við viðskiftafólkini (skrásetarar) og skrásetingarmannagongdini, sum í dag er løgd til ein triðjapart at umsita.

Lógin ásetur, at tað er umsitari, ið hevur ábyrgdina av, at lógin verður hildin, hetta hóast umsitari velur at leggja partar av umsitingini til undirveitarar.

Verandi skipan heldur í stóran mun fram
Umsitari skal framhaldandi seta nágreiniligu treytirnar, so sum handilstreytir og treytir annars fyri skrásetarar og fyri tey, sum taka sær av sambandinum við viðskiftafólkini og skrásetingarmannagongdini. Hetta tí, at umsitingin er ein bústaðarávísingartænasta, har tað heilt natúrliga eru atknýttar handilstreytir.

Umsitari kann soleiðis gjøgnum sínar handilstreytir áseta treytir um t.d. brúksskyldu ella afturtøku av økisnøvnum á internetinum.

Verandi skipan, har skráseting av økisnavni á internetinum er galdandi fyri 1 ár í senn við møguleika fyri endurnýggjan við at gjalda eitt árligt gjald, kann halda áfram. Tað er umráðandi, at øll framhaldandi hava trygd fyri javnbjóðis atkomu til at kunna skráseta økisnøvn á internetinum, uttan at seta treyt fyri skrásetingini, uttan at tað er gjørt eitt eftirlit av einum ella hvørjum slag frammanundan. Møguligar ósemjur, sum seinni kunnu íkoma, má umsitari royna at loysa. Ber ikki til at finna eina loysn, kann málið roynast í rættinum.

Ásetingar, ið venda sær beinleiðis til skrásetarar
Tey, sum skráseta økisnøvn, hava skyldu til at vísa sømiligan atburð samsvarandi góðum økisnavnasiði. Hetta er at meta sum ein aðaltreyt. Ætlanin er, at rættarøkið við hesum verður broytt gjøgnum einstøk mál, ið, sum frálíður, skapa siðvenju, har tey virði, sum eru mett at hava týdning fyri viðkomandi øki, verða endurspeglað.

Kravið um at halda góðan økisnavnasið er galdandi bæði fyri skráseting, nýtslu, marknaðarføring, avhendan, útinning og at siga frá sær økisnøvn. Ætlanin er ikki at gera

avmarkingar fyri, hvørjar hendingar viðvíkjandi skráseting og nýtslu av økisnøvnum kunnu verða fevndar av skylduni at fylgja góðum økisnavnasiði.

Tá kravið um góðan økisnavnasið verður sett í verk, kann ein røð av ósambæriligum atlitum koma fyri, sum mugu vigast ímóti hvørjum øðrum. Hóast reglan um góðan økisnavnasið ofta er ætlað privatum skrásetarum, eru áhugamálini við hesum ikki vigað til fyrimuns fyri privata skrásetaran. Handilslig og samfelagslig viðurskifti kunnu í nøkrum førum viga tyngri.

Skrásetarar mugu ikki skráseta og varðveita skrásetingar av økisnøvnum bert við víðarisølu ella útleigan fyri eyga. Tað merkir, at viðkomandi skrásetari ikki hevur sum endamál at nýta hesi sjálvur, men bert fyri at selja hesi víðari til persónar, fyritøkur, stovnar v.m., ið t.d. hava rakstrarbúskaparlig, persónlig ella egin privat áhugamál í júst hesum økisnavninum.

Umsitari kann í handilstreytirnar áseta, at avtalan millum partarnar kann fara úr gildi og økisnavnið verða strikað í einum føri, har økisnavnið verður nýtt í ósamsvari við góðan økisnavnasið ella í einum føri, har skrásetari leggur økisnøvn inn undir seg við tí endamáli at selja víðari ella leiga út við vinningi fyri eygað. Umsitari kann tó ikki av sínum eintingum strika eitt økisnavn, tí hetta kann bert verða gjørt, um dómstólarnir frammanundan við einum dómi hava staðfest, at økisnavnið skal strikast.

Í grannalondunum er umsitingin av økisnøvnum skipað við lóggávu, ið er meinlík henni, ið nú verður skotið upp at seta í gildi í Føroyum. Kærunevndir og dómstólarnir í hesum londunum hava skapt eina rættarpraksis fyri, nær talan er um góðan økisnavnasið.

Eftirlit
Skotið verður upp, at Fjarskiftiseftirlitið hevur eftirlit við, at umsitari yvirheldur ásetingarnar í lógini, og fær Fjarskiftiseftirlitið í tí sambandi heimild til at geva boð, at geva tvingsilsbøtur og at taka aftur loyvir. Eftirlitsskipanin minnir harvið um skipanina á m.a. fjarskiftisøkinum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Økið hevur higartil ikki verið skipað við lóg. Í arbeiðinum við lógaruppskotinum hevur breið semja verið um at fáa yvirskipaðar karmar at fremja dygdargóða menning av umsitingini av økisnøvnum í føroyska samfelagnum. Semja tykist eisini vera um, at lógaruppskotið skal styðja uppundir, at verandi skipan viðvíkjandi umsiting av økisnavninum .fo í mest møguligan mun heldur fram.

Harumframt skal lógaruppskotið tryggja atkomu, gjøgnumskygni, gagnnýtslu og trygd fyri økisnavnið .fo.

Yvirskipað inniheldur lógaruppskotið:

- Heimild hjá landsstýrismanninum at bjóða umsitingina út eftir nærri ásettum treytum
- Heimild hjá landsstýrismanninum at áseta nærri reglur fyri umsitingina av økisnavninum .fo
- Krøv til umsitara um m.a. at tryggja støðugan, tryggan og óslitnan rakstur av økisnavninum .fo
- Krøv um trygdarpolitikk og kt-grannskoðan v.m.
- Krøv um varðveitslu av upplýsingum
- Krøv til virksemi og eftirlit við virkseminum hjá umsitara
- Karmar fyri, at verandi skipan í stóran mun kann halda fram
- Einfaldar reglur fyri borgarar, ið skráseta ella ynskja at skráseta eitt økisnavn

Tá umræður umsitingina av økisnavninum .fo, er tørvur á at fáa staðfest greiða myndugleikaábyrgd og fáa yvirkipaðar karmar fyri m.a. umsiting av økisnavninum .fo og kt-trygd innan økið.

Í lógaruppskotinum eru atlit tikin til rættartrygdina hjá skrásetara og brúkarum av økisnavninum .fo yvirhøvur. Herumframt hevur tað týdning at tryggja myndugleikanum formliga heimild at leggja uppí, um umsitingin av økisnavninum .fo ikki virkar til lítar.

Lóggáva á økinum gevur eisini greidleika hjá brúkarunum yvir leiklutabýtið millum myndugleika og umsitara av økisnøvnum á internetinum.

1.5. Ummæli og ummælisskjøl

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Dátueftirlitinum, Elektron, Fíggjarmálaráðnum, FO-ráðnum, Føroya Tele, Gjaldstovuni, Vinnustovninum (Fjarskiftiseftirlitinum) og Vinnuhúsinum (KT-felagnum og Felagnum Samskifti). Uppskotið hevur eisini ligið frammi á heimasíðu Umhvørvis- og vinnumálaráðsins.

Hoyringarsvar komu frá:

- Dátueftirlitinum, fylgiskjal 1
- Fíggjarmálaráðnum, fylgiskjal 2
- FO-ráðnum, fylgiskjal 3
- Føroya Tele, fylgiskjal 4
- KT-felagnum, fylgiskjal 5
- Felagnum Samskifti, fylgiskjal 6

Elektron, Gjaldstovan og Vinnustovnurin hava ikki sent Umhvørvis- og vinnumálaráðnum viðmerkingar til uppskotið. Vinnustovnurin (Fjarskiftiseftirlitið) hevur luttikið í tilgondini at fyrireika uppskotið.

Eitt hoyringarnotat er lagt við sum fylgiskjal 7.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið, tí lagt verður upp til, at Fjarskiftiseftirlitið skal røkja ávísar uppgávur.

Lagt verður upp til, at Fjarskiftiseftirlitið skal taka sær av ávísum uppgávum, um avgerð verður tikin um at hava eitt útboð, og Fjarskiftiseftirlitið skal eisini vera eftirlitsmyndugleiki.

Lagt verður upp til, at umsitari rindar fyri umsitingarligu útreiðslurnar av eftirlitinum. Í hesum liggur, at inntøkurnar, sum umsitari fær fyri umsiting av økisnøvnum, eisini skulu nýtast til at bera útreiðslurnar av eftirlitinum hjá Fjarskiftiseftirlitinum. Mett verður, at útreiðslurnar hjá Fjarskiftiseftirlitinum av at røkja eftirlitsuppgávurnar fara at liggja um 50.000-100.000 kr. um árið.

Um avgerð verður tikin um at bjóða umsitingina út, kunnu útreiðslurnar av at fyrireika og halda eitt útboð verða álagdar teimum, sum geva tilboð.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri landið, sí omanfyri um fíggjarligar avleiðingar. Økta eftirlitsvirksemið hjá Vinnustovninum (Fjarskiftiseftirlitinum) í hesum sambandi verður fíggjað við brúkaragjøldum frá umsitara.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ikki stórvegis avleiðingar fyri vinnuna.

FO-ráðið umsitur økisnavnið .fo, og ætlanin er ikki at broyta hetta, tá lógin kemur í gildi. Fyri verandi umsitara hevur uppskotið ikki stórar umsitingarligar og fíggjarligar broytingar við sær. Umsitari skal sambært lógini bera útreiðslurnar av eftirliti hjá Fjarskiftiseftirlitinum, men hesar útreiðslur verða ikki mettar at hava við sær príshækkingar. Roknskapirnir hjá umsitara liggja frammi á heimasíðu FO-ráðsins. Umsitari væntar at kunna halda útreiðslurnar innanfyri verandi fíggjarligu karmar.

Lógaruppskotið hevur við sær økta trygd og avmarkar vandar fyri, at onnur skráseta økisnøvn á internetinum, sum natúrliga eru knýtt at ávísari fyritøku. Tí hevur lógaruppskotið yvirhøvur positivar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Eingir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið verður mett at vera í samsvari við Hoyvíkssáttmálan, sbr. løgtingslóg nr. 66 frá 18. mai 2006 um at seta í gildi sáttmála millum stjórn Íslands øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri hinumegin, Evropeiska mannarættindasáttmálan, sbr. Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, sbr. Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2009 om rettigheder for personer med handicap.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at uppskotið fer at elva til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Fjarskiftiseftirlitið kann áleggja umsitara tvingsilsbøtur. Hendan heimildin er ein natúrlig avleiðing av skipanini, har tað almenna bjóðar út loyvið at umsita økisnøvn vegna tað almenna. Fjarskiftiseftirlitið hevur eftirlit við, at lógin verður hildin, og kann geva boð og tvingsilsbøtur, og í ringasta føri taka aftur loyvið. Ásetingarnar eru gjørdar við fyrimynd í aðrari sambæriligari lóggávu, eitt nú fjarskiftislóggávuni.

Uppskotið hevur annars ongar ásetingar um revsing, pantiheimildir ella onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki. Umsitari skal gera treytir fyri skrásetarar um m.a. brúksskyldu, nýtslu og afturtøku.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Borgarar, sum ynskja at skráseta eitt økisnavn á internetinum, gjalda, á sama hátt sum í dag, eitt gjald í sambandi við skráseting. Talan er ikki um eitt gjald, sum tað almenna áleggur, men eitt gjald, sum umsitari ásetur, og er tað partur av handilstreytunum hjá umistara.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur hvørki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ávísar heimildir til landsstýrismannin.

Sambært § 3, stk. 1 kann landsstýrismaðurin bjóða umsitingina av økisnavninum .fo ella øðrum økisnøvnum, sum eru tillutað Føroyum ella á annan hátta knýtt at Føroyum, út alment eftir nærri ásettum treytum, ella sambært § 3, stk. 3 leingja eitt verandi loyvi til at umsita eitt økisnavn.
Sambært § 7, stk. 2 skulu viðtøkur hjá umsitara góðkennast av landsstýrismanninum.

Sambært § 10, stk. 4 kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um innihaldið í trygdarpolitikkinum hjá umsitara, heruppií trygdarkrøv og -standardar, krøv til kt-grannskoðan, krøv um at ávísar skráir bert mugu goymast í einum góðkendum landi o.a.

Í uppskotinum verður uppgávan at hava eftirlit við umsitarum av økisnøvnum løgd til Fjarskiftiseftirlitið.

Frammanundan hevur Fjarskiftiseftirlitið eftirlit sambært løgtinglóg nr. 72 frá 22. mai 2015 um fjarskifti við at veitarar av fjarskiftiskervum og fjarskiftistænastum halda sínar skyldur. Røttu fakligu førleikarnir eru á stovninum til eisini at hava eftirlit eftir hesi lógini, og tí verður mett hóskandi at leggja eftirlitið til hendan stovnin.

Í sambandi við, at Fjarskiftiseftirlitið skal hava eftirlitið sambært lógini, eru hesar heimildir lagdar til stovnin:

- Tekur landsstýrismaðurin avgerð um at bjóða loyvi at umsita eitt økisnavn út, ásetur Fjarskiftiseftirlitið nærri reglur um fremjan av útboðnum, útnevnir vinnaran av útboðnum og gevur loyvið út og ásetur í tí sambandi loyvistreytirnar.
- Fjarskiftiseftirlitið hevur eftirlit við, at lógin og reglur, ásettar við heimild í lógini, umframt treytir, ásettar í loyvum, ið eru givin sambært lógini, verða yvirhildnar.
- Fjarskiftiseftirlitið kann geva umsitara boð um at halda ásetingarnar í lóggávuni og treytirnar í loyvinum.
- Fjarskiftiseftirlitið kann krevja allar upplýsingar og tilfar frá umsitara, heruppií útgreiningar í sambandi við roknskaparuppsetanina o.a., um tað verður mett viðkomandi í sambandi við umsiting og eftirlit sambært lógini.
- Fjarskiftiseftirlitið kann áleggja umsitara tvingsilsbøtur fyri at tvinga ígjøgnum gerðir ella undanlát.
- Fjarskiftiseftirlitið kann taka aftur eitt loyvi, um umsitari grovliga ella ferð eftir ferð fremur brot á lógina, reglur settar í gildi við heimild í lógini ella treytir í einum loyvi, sum er givið sambært lógini, ella virksemi hjá umsitara av øðrum orsøkum heldur uppat í loyvistíðini.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	Nei	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Talan er um eina endamálsorðing, har staðfest verður, at endamálið við lógini er at skipa karmarnar fyri atgongd, nýtslu og umsiting av økisnøvnum, sum eru tillutað Føroyum ella økisnøvnum, sum á annan hátt eru knýtt at Føroyum. Lógin fevnir um umsitarar og skrásetarar av økisnøvnum, sum serstakt eru tillutað ella á annan hátt eru knýtt at Føroyum. Í lógini er ásett ein røð av grundleggjandi meginreglum um m.a. grundfesti í internetsamfelagnum, non-profit, sjálvregulering, trygd, støðufesti, gjøgnumskygni og ikki-diskriminatión. Hesar meginreglur eru at finna í kap. 4 í uppskotinum.

Til § 2
Ásetingin snýr seg um, hvørji økisnøvn eru fevnd av lógini. Skotið verður upp, at tað verður beinleiðis ásett, at økisnavnið .fo, sum er tillutað Føroyum, skal verða fevnt av lógini.

ICANN hevur tillutað Føroyum økisnavnið .fo, og talan er um eitt økisnavn, sum landsstýrið hevur ræðið á, men við einum loyvi kann tilluta einum umsitara umsitingina av økisnavninum. Talan er um tilfeingi, sum landið eigur.

Umsiting av einum økisnavni fevnir bæði um virksemið hjá umsitara, skyldur og møguleikar eins og tað fevnir um tey krøv, ið beinleiðis í lógini verða sett til skrásetarar, og um tær handilstreytir, ið umsitari setur.

Hugtakið økisnøvn verður í hesum uppskotinum nýtt sum eitt hugtak fyri øll stig í økisnavnaskipanini hjá ICANN, heruppií ”førsteordensdomæner”, “andenordensdomæner” o.o.

”Førsteordensdomæner” eru býtt sundur í tveir bólkar, ávikavist national “topdomænenavne” (ccTLD - country code Top Level Domain), t.d. .fo, .dk, og generisk “topdomænenavne” á (gTLD - generic Top Level Domain), fx . com og . org. “Førsteordensdomæner” verða generelt og eisini í hesum uppskotinum nevnd ”topdomænenavne”. Tað nationala ”topdomænenavnið” .fo hoyrir undir bólkin: Økisnavn, sum er tillutað Føroyum.

Í 2011 gjørdi ICANN tað møguligt at søkja um generisk ”topdomænenavne” við landafrøðiligum tilknýti til eitt land, stað, bý ella líknandi. Ítøkilig dømi um slík ”topdomænenavne” eru .berlin og .london. Um slík ”topdomænenavne” hava eitt navn við tilknýti til Føroyar, verða tey eftir lógini nevnd økisnøvn, sum á annan hátt hava tilknýti til Føroyar. Eitt slíkt ”topdomænenavn” kundi eitt nú verið .streymoy, .vágar el. líkn. Eitt slíkt økisnavn hevur ikki sama týdning og ávirkan sum økisnavnið .fo, sum er eitt alment tilfeingi, sum er tillutað Føroyum. Umsøkjarar kunnu søkja hjá ICANN um at fáa tillutað eitt generiskt økisnavn og skulu rinda fyri at fáa tað tillutað.

Ein umsitari (á enskum nevndur registry) er ein liður í einari alheims internetøkisnavnaskipan, sum stendur fyri umsitingini av einum ”topdomænenavni”. Umsitingin inniber vanliga rakstur av dátugrunnum yvir skrásett økisnøvn undir ”topdomænenavninum” umframt at áseta reglur, sum eru galdandi fyri skráseting av økisnøvnum undir ”topdomænenavninum”. Núverandi umsitari í Føroyum av ”topdomænenavninum” .fo er FO-ráðið.

Undir einum ”topdomænenavni” kunnu økisnøvn skrásetast sum t.d. logting.fo, uvmr.fo. Hesi økisnøvn eru ”andenordensdomænenavne” í mun til ”topdomænenavnið” .fo. Samansetingin av hesum økisnøvnunum verður nevnd eitt økisnavn.

Ásetingin í § 2 avmarkar, hvørji økisnøvn eru fevnd av lógini. Skotið verður upp, at lógin fevnir um eitt og hvørt økisnavn, sum er tillutað ella er knýtt at Føroyum, heruppií ”topdomænenavnið” .fo.

Ásetingin fevnir um øll økisnøvn, sum frá altjóða síðu eru ella verða tillutað Føroyum. Harvið verður hædd tikin fyri tí støðu, har Føroyar við tíðini kunnu fáa tillutað onnur økisnøvn, sum áhugi er fyri at skráseta økisnøvn undir. Ásetingin fevnir sostatt eisini um ”anden- og tredjeordensdomæner”.

Økisnøvn, sum á annan hátt eru knýtt at Føroyum, eru økisnøvn, har Føroyar sambært reglunum hjá ICANN hava ávirkan á umsóknina, tillutanina ella umsitingina av økisnavninum, uttan at hava ræðið á økisnavninum. Eitt dømi um slíkt økisnavn kundi verið eitt økisnavn við einum landafrøðiligum navni, sum hevur tilknýti til Føroyar, t.d. .streymoy og .tórshavn. Av tí at Føroyar ikki hava ræðið á slíkum økisnøvnum, er tað ikki møguligt at regulera umsitingina av hesum økisnøvnum í sama mun sum økisnøvn, sum eru tillutað Føroyum, sbr. viðmerkingarnar til § 17.

Aftaná avgerð hjá ICANN tann 20. juni 2011 bleiv tað møguligt at søkja um tillutan av eini rød av nýggjum ”topdomænenøvnum”. ICANN vísir í sínum leiðreglum um umsóknartilgongdina viðvíkjandi nýggjum økisnøvnum á, at tað ítøkiliga viðvíkjandi umsóknum um økisnøvn við landafrøðiligum nøvnum er galdandi, at eitt ”ikki-mótmæli” frá viðkomandi stjórn ella almennum myndugleika skal vera viðlagt umsóknini. Eitt økisnavn kann bert verða tillutað, um hetta kravið og onnur krøv í leiðreglunum hjá ICANN eru lokin.

Tað ber ikki til at spáa um altjóða gongdina á økisnavnaøkinum. Tí skal lógin rúma einari møguligari menning á økinum. Lagt verður upp til, at lógin skal kunna rúma einari slíkari menning, har Føroyar í framtíðini kunnu fáa ávíst ræði ella ávirkan á økisnøvn, ið á annan hátt verða knýtt at Føroyum. Hetta er orsøkin til, at tað yvirskipað verður skilt ímillum økisnøvn, sum ávikavist eru tillutað Føroyum og á annan hátt eru knýtt at Føroyum.

Til § 3

Í stk. 1 verður skotið upp, at landsstýrismaðurin kann taka avgerð um at bjóða umsitingina av einum ella fleiri økisnøvnum út, ella landsstýrismaðurin kann taka avgerð um, at eitt verandi loyvi til at umsita eitt økisnavn verður longt. Møguleikin fyri at leingja eitt loyvi er við til at tryggja framhald og tryggar karmar fyri skráseting av økisnøvnum, samstundis sum møguleiki er fyri at gera eitt útboð. Tíðarskeiðið fyri eini leingjan ásetur landsstýrismaðurin sambært § 3, stk. 2, nr. 2 í uppskotinum.

Í sambandi við eina møguliga støðutakan til, um eitt útboð skal fara fram ella eitt loyvi skal leingjast, er tað viðkomandi, at landsstýrismaðurin hoyrir vinnuna fyri á tann hátt at fáa innlit í, hvat internetsamfelagið heldur um spurningin. Sjónarmiðini hjá internetsamfelagnum eru týðandi partur í avgerðargrundarlagnum hjá landsstýrismanninum.

Fíggjarlig viðurskifti fyri tað almenna og internetsamfelagið eru týðandi atlit í sambandi við støðutakanina, um talan skal vera um útboð ella leingjan. Við einum kravi um útboð hvørja

ferð, eitt loyvi fór úr gildi, kundi tað havt við sær týðandi fíggjarlig tap í sambandi við fyriskipan av útboði, um tað vísir seg ikki at vera onnur áhugað enn verandi umsitari.

Verður eitt loyvi útbjóðað, hevur hetta við sær, at tey áhugaðu, sum geva tilboð, við tilboðunum kappast um at fáa loyvið. Avgerandi fyri, hvør fær loyvi, er innihaldið í tilboðnum í mun til tey metingarstøði, ið landsstýrismaðurin hevur sett. Tann, ið fær loyvið, skal umsita hetta og hevur hareftir ein rætt og eina skyldu til at umsita økisnavnið ella - nøvnini eftir nærri ásettum reglum og treytum. Skyldan hevur við sær, at umsitari frá tí tíðspunkti, sum er ásett í loyvinum, skal seta í verk ella yvirtaka umsitingina uttan nakran ampa fyri verandi ella komandi skrásetarar, og at umsitari skal umsita viðkomandi økisnavn alla loyvistíðina.

Sambært stk. 2 ásetur landsstýrismaðurin nærri reglur um útboð, um hann tekur avgerð um, at eitt loyvi skal bjóðast út. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um, hvørji økisnøvn eru fevnd av útboðnum, loyvistíðarskeiði og leingjan av verandi loyvi, treytir, sum dentur skal leggjast á, tá mett verður um innkomin tilboð, og ta støðu, at tikið ikki verður av nøkrum tilboði, heruppií at ábyrgdin av umsitingini verður løgd til Fjarskiftiseftirlitið, inntil ein umsitari verður útnevndur, ella at økisnavnið ikki skal nýtast.

Fyri hvørt økisnavn, sum verður bjóðað út, kann bert ein umsitari útnevnast.

Loyvistíðarskeiðið eigur at verða ásett soleiðis, at tað kann vera støðufesti á økinum í eitt tíðarskeið, men samstundis skal atlit takast til menning og effektiva umsiting á økinum.

Ásett er í stk. 3, at landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur í sambandi við, at eitt verandi loyvi verður longt sambært stk. 1. Ásetingin skal síggjast í samanhangi við stk. 1, har ásett er, at landsstýrismaðurin kann leingja eitt verandi loyvi. Eftir stk. 3 kunnu m.a. verða ásettar reglur um, nær ein hoyring skal fara fram um eitt møguligt útboð ella leingjan av verandi loyvi. Longdin av leingjan av einum loyvi eigur at verða løgd út frá atlitinum til at tryggja støðufestið á økinum. Hetta skal vigast upp móti atlitinum til samfelagsliga áhugan í at tryggja menning og effektiva umsiting. Ásetingin er grundarlag fyri eini leingjan av verandi loyvi, ið er givið á ólógreguleraðum grundarlagi.

Til § 4

Skotið verður upp, at Fjarskiftiseftirlitið fær heimild til at áseta nærri reglur um fremjan av útboðnum. Talan er um nærri reglur, sum liggja innanfyri teir yvirskipaðu karmar, sum landsstýrismaðurin hevur ásett sambært § 3 í uppskotinum. Sostatt er talan um reglur, sum Fjarskiftiseftirlitið ásetur, um landsstýrismaðurin hevur tikið avgerð um, sbrt. § 3, stk. 1 í uppskotinum, at eitt útboð skal haldast eftir.

Í stk. 1 verður skotið upp, at Fjarskiftiseftirlitið kann áseta reglur um útboðstilfar, fyritreytir fyri luttøku í útboðnum, endurgjald og revsing fyri brot á reglur fyri útboðið, heruppií burturvísing frá útboðnum, o.a. Eisini kann Fjarskiftiseftirlitið áseta, at luttakararnir bera útreiðslurnar av, at útboðið verður fyrireikað.

Sambært stk. 2 útnevnir Fjarskiftiseftirlitið vinnaran av útboðnum, og gevur út loyvi til at umsita økisnavnið, sum útboðið fevnir um. Avgerðin um, hvør vinnur, verður tikin aftaná eina meting av innkomnu tilboðunum. Mett verður um, hvørt tilboðsgevararnir lúka objektivt ásettu reglurnar um fyritreytir fyri luttøku í útboðnum (prækvalifikatiónskrøvini), heruppií tey av landsstýrismanninum ásettu minstu krøv.

Í teimum førum, har bert ein bjóðar, kann viðkomandi verða útnevndur sum vinnari, um viðkomandi lýkur tey settu krøvini.

Skotið verður upp í stk. 3, at Fjarskiftiseftirlitið ásetur loyvistreytirnar samsvarandi tí givna tilboðnum. Loyvistreytirnar eru krøv sambært tilboðnum, sum umsitari til eina og hvørja tíð skal lúka. Umframt treytirnar í loyvinum eru eisini krøv í lógini og reglum, ásettar við heimild í lógini, sum umsitari skal lúka.

Til § 5
Í § 5, stk. 1 eru ásetingarnar í lógini útgreinaðar, ið ikki eru galdandi fyri Fjarskiftiseftirlitið, um Fjarskiftiseftirlitið fyribils sambært § 3, stk. 2, nr. 4 ella § 22, stk. 2 yvirtekur umsitingina av økisnøvnum. Í tí føri, at Fjarskiftiseftirlitið eitt nú orsakað av afturtøku av loyvinum, ella tí umsitari letur loyvið inn aftur, ella tí landsstýrismaðurin sambært § 22, stk. 2 tekur avgerð um at leggja umsitingina til Fjarskiftiseftirlitið, eru § 6, stk. 1 og stk. 2, § 7, § 10, stk. 5 og § 18 ikki galdandi fyri umsitingina hjá Fjarskiftiseftirlitinum.

Ásetingin í stk.1 er skotin upp, tí fleiri ásetingar í lógini, ið viðvíkja umsitara, eru at meta sum óviðkomandi og týdningarleysar í mun til eina fyribils umsiting av økisnøvnum hjá Fjarskiftiseftirlitinum. Fylgjandi ásetingar eru óviðkomandi og týdningarleysar fyri umsiting Fjarskiftiseftirlitsins: § 6, stk. 1 um breiða umboðan úr føroyska internet-samfelagnum, § 6, stk. 2 um at virksemið ikki kann útinnast við vinningi fyri eyga (non-profit), § 7 um viðtøkur fyri virksemið og um grannskoðaðan ársroknskap við frágreiðing um virksemið, § 10, stk. 5, um avrit av avtalunum um varðveitslu og kt-grannskoðan, og § 18 um eftirlit.

Í stk. 2 er skotið upp, at tá Fjarskiftiseftirlitið fyribils yvirtekur umsitingina av økisnøvnum sambært § 3, stk. 2, nr. 4 ella § 22, stk. 2, hevur Fjarskiftiseftirlitið heimild til at krevja gjald frá skrásettum fyri útreiðslurnar av umsitingini eftir somu reglum og meginreglum sum umsitari.

Í tí føri Fjarskiftiseftirlitið hevur tikið aftur eitt loyvi, sbrt. § 22, stk. 1, kann landsstýrismaðurin m.a. gera av, at Fjarskiftiseftirlitið skal yvirtaka umsitingina av viðkomandi økisnavni. Sama er galdandi, um tað við almennum útboði av umsitingini av økisnøvnum ikki verður funnin ein umsitari, sbr. § 4, stk. 2, nr. 4. Fjarskiftiseftirlitið vil kunna útveita uppgávuna og gjalda øðrum fyri at fremja alla ella partar av uppgávuni.

Við atliti til, at Fjarskiftiseftirlitið skal fáa útreiðslurnar/kostnaðin av umsitingini goldnar, er skotið upp at geva Fjarskiftiseftirlitinum heimild at krevja gjald í tílíkum føri. Tá gjøldini skulu svara til kostnaðin/útreiðslurnar hjá Fjarskiftiseftirlitinum av umsitingini, verður umsitingin í tílíkum føri framd á kostnaðargrundaðum støði. Um Fjarskiftiseftirlitið yvirtekur umsitingina av økisnøvnum, hevur Fjarskiftiseftirlitið heimild at krevja gjald frá yvirtøkudegnum at rokna (overtagelsesdagen).

Í stk. 3 er skotið upp at geva landsstýrismanninum heimild at áseta nærri reglur um gjald. Av tí, at tað ikki frammanundan er givið, hvat tað fer at kosta Fjarskiftiseftirlitinum at yvirtaka umsitingina av økisnøvnum, kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur fyri gjøldini, ið Fjarskiftiseftirlititð kann krevja í sambandi við umsitingina av økisnøvnum.

Til § 6
Í stk. 1 er skotið upp, at umsitari skal hava hóskandi fakligar førleikar, undir hesum breiða umboðan úr internet samfelagnum og vera grundfestur í føroyska internet samfelagnum, heruppií skulu vera umboð fyri privatar brúkarar, professionellar brúkarar og veitarar.

Hugtakið ”internet-samfelag” fevnir sum útgangsstøði um øll tey, ið hava áhuga fyri menningini av internetinum. Í roynd og veru fevnir hugtakið um ein og hvønn, ið hevur áhuga fyri økinum. Hugtakið internet-samfelag hevur soleiðis ikki eina avmarkaða støddd, men er dynamiskt og kann mennast sum frá líður.

At tryggja breiða umboðan kann eitt nú vera, at internetinteressentar eru breitt umboðaðir í evstu leiðslu- og avgerðargongd umsitarans.

Endamálið við ásetingini í stk. 2 er at tryggja, at umsitingin av økisnøvnum á internetinum ikki fer fram við vinningi fyri eyga. Skotið verður upp at halda fram við meginregluni um, at umsitingin skal útinnast á einum kostnaðargrundaðum og ikki-yvirskotsgevandi støði (non-profit). Samstundis verður krav sett um effektivitet og gjøgnumskygni í fíggjarviðurskiftum umsitarans.

Við at varðveita verandi meginreglu um ikki-yvirskotsgevandi støði (non-profit), fer kostnaðurin hjá skrásetarunum at svara til tað, sum tað væntandi hevði kostað, um uppgávan varð útint í almennum høpi og fíggjað við gjøldum.

Raksturin og útboð av tænastum skulu vera grundað á samlaða kostnaðin av útreiðslunum og dentur leggjast á rímiligan prís. Gjøld skulu endurspegla veruligu útreiðslurnar og vera grundað á eitt objektivt, gjøgnumskygt og ikki-diskriminerandi grundarlag. Hetta merkir, at gjøld fyri umsiting einans kunnu byggja á samlaðu útreiðslurnar í eitt longri tíðarskeið. Langtíðar fíggjarviðurskiftini skulu vera rímilig, eins og kapitalur má vera til at tryggja framtíðar raksturin, soleiðis at tað er rúm fyri menning. Kostnaðargrundaður rakstur forðar ikki fyri, at uppgávur verða bodnar út, og at tænastur verða keyptar.

Sambært stk. 3 skal umsitari í mest møguligan mun tryggja, at økisnøvn verða umsitin til gagns fyri vinnu, tað almenna og einstaklingar. Hetta hevur við sær, at umsitari eigur at fylgja nationalu og altjóða menningini á økinum, undir hesum millum annað, hvat gongur fyri seg í CENTR (*Council of European National Top Level Domain Registries*, ið er evropeiski felagsskapurin fyri ccTLD (landastaðbundin økisnøvn á hægsta stigi)), RIPE (*Réseaux IP Européens*, ið er evropeiskt IP netverk) og ICANN (*Internet Corporation for Assigned Names and Numbers*) v.m.

Umsitari skal altíð eygleiða altjóða viðtøkur á økinum, og er tað í hesum sambandi umráðandi, at umsitari hevur viðkomandi fakligar førleikar og kann fylgja við í menningini.

Umsitari skal vera kostnaðartilvitaður í umsitingini. Hetta merkir, at umsitari ikki skal fremja fíggjarlig tiltøk útyvir tað, sum er vanligt og rímiligt. Umsitari skal soleiðis, umframt at fylgja kravinum um, at virksemið ikki má útinnast við vinningi fyri eyga, sbr. stk. 2, útinna sítt virksemi á ein slíkan hátt, at kostnaðarstøðið svarar til tað, sum man kann vænta av eini fyritøku í kapping ella einum stovni í almennum høpi. Ásetingin hevur eisini við sær, at

avtalur við feløg, fyritøkur v.m., ið hava møgulig atknýtt áhugamál við umsitara, skulu grundast á marknaðartreytir.

Í stk. 4 er ásett ein heimild til landsstýrismannin at áseta nærri reglur um umsitingina av einum ávísum ella av fleiri økisnøvnum. Ásannandi, at menningin á internetøkinum og innan nýtslu av økisnøvnum gongur skjótt fyri seg bæði tøkniliga og innan altjóða umsiting, er tørvur á, at reglurnar kunnu tillagast í einum loyvistíðarskeiði. Tí verður skotið upp, at landsstýrismaðurin skal kunna áseta nærri reglur í kunngerð.

At menningin gongur skjótt fyri seg hevur við sær, at tað leypandi er tørvur á at meta um, hvørji krøv skulu galda fyri umsitara. Tí ber ikki til at áseta øll krøv beinleiðis í lógini.

Heimildin í stk. 4 at áseta nærri reglur kann nýtast í øllum loyvistíðarskeiðinum, og er ikki ein heimild, ið bert kann nýtast til at áseta nærri reglur, tá ið eitt nýtt útboð verður gjørt. Landsstýrismaðurin skal sjálvsagt leggja upp fyri, at umsitari má fáa eina rímiliga freist til at lúka møgulig nýggj ella broytt krøv, ið verða ásett í kunngerð.

Tær reglur, sum verða ásettar í kunngerðini, koma afturat teimum krøvum, sum eru beinleiðis ásett í lógini.

Eftir ásetingini hevur landsstýrismaðurin møguleika til at áseta, at reglurnar bert galda fyri eitt ávíst økisnavn, ið er tillutað Føroyum, ella eru galdandi fyri øll økisnøvn, sum eru tillutað Føroyum. Á tann hátt ber til at seta ymisk krøv til umsitingina av ymiskum økisnøvnum.

Reglurnar, sum landsstýrismaðurin kann áseta í kunngerð, fevna um bæði reglur um faklig og fíggjarlig viðurskifti og til tekniskar førleikar. Eitt nú kann hann áseta nærri reglur um upplýsingar í ársfrásøgnini hjá umsitara, gjøgnumskygni, almannakunngering av upplýsingum, og um krøv til tøkniligar skipanir og skrásetingar. Harafturat kann landsstýrismaðurin eisini eftir ásetingini eitt nú áseta, at umsitari leypandi skal fylgja altjóða menningini á økinum og skipa umsitingina sambært altjóða reglum.

Fjarskiftiseftirlitið hevur eftirlit við reglum, ið verða ásettar við heimild í ásetingini, sbr. § 18, stk. 1.

Til § 7
Ásett er í stk. 1, at umsitari á sama hátt sum higartil skal gera viðtøkur fyri virksemið. Viðtøkurnar eru við til at skapa gjøgnumskygni um virksemið hjá umsitara.

Skotið verður upp í stk. 2, at viðtøkurnar og broytingar í viðtøkunum skulu góðkennast av landsstýrismanninum. Við hesum fæst trygd fyri, at viðtøkurnar, sum eru grundarlag undir virkseminum hjá umsitara, eru í samsvari við lógarinnar endamál. Landsstýrismaðurin kann góðkenna viðtøkurnar við tí fyrivarni, at treytir v.m. verða hildnar. Seinni broytingar í viðtøkunum skulu, eins og upprunaligu viðtøkurnar, eisini góðkennast av landsstýrismanninum.

Sambært stk. 3 og 4 skal umsitari saman við tí grannskoðaða roknskapinum lata landsstýrismanninum eina frágreiðing um virksemi umsitarans í roknskaparárinum. Frágreiðingin skal latast inn í seinasta lagi 5 mánaðir eftir, at roknskaparárið er endað. Umsitari skal almannakunngera grannskoðaðu ársfrásøgnina.

Til § 8

Ásetingin í stk. 1 stuðlar upp undir verandi skipan, sum í stóran mun heldur fram soleiðis, at umsitari ásetur eina røð av treytum, ið hava týdning fyri skrásetarar. Umsitari skal til dømis áseta handilstreytir. Til tess at nágreina, at umsitari kann regulera ávís viðurskifti, sum fyri skrásetaran kunnu tykjast at hava inntrívandi eyðkenni, verður í stk. 1 skotið upp, at umsitari skal áseta handilstreytir. Tá umsitari ásetur handilstreytir kunnu hesar sambært stk. 1, nr. 1-3 fevna um treytir so sum brúksskyldu, skráseting, nýtslu og striking av skrásettum økisnavni. Stk. 1 staðfestir soleiðis, at umsitari skal áseta handilstreytir, og eru tað í stk. 1, nr. 1-3 givin dømi um viðurskifti, sum umsitari kann velja at gera treytir um, er tørvur á tí.

Til stk. 1, nr. 1

Setur umsitari brúksskyldu í verk, er tað uppgávan hjá umsitara at taka støðu til, hvørji sløg av nýtslu eru at meta sum hóskandi, heruppií um endamálið bara er at raka tey, ið gera ónáðir, ella um krøv skulu setast um, at skrásetarar veruliga skulu nýta síni økisnøvn. Í hesum sambandi skal umsitari taka støðu til, hvat liggur í, at talan er um veruliga nýtslu, og møguliga nær eitt økisnavn skal verða tikið í nýtslu. Umsitari kann til dømis áseta, at eitt økisnavn skal verða tikið í nýtslu innanfyri nærri ásett tíðarskeið.

Møgulig áseting av brúksskyldu fyri økisnøvn er treytað av ávísum virksemi hjá einstaka skrásetaranum, sum t.d. at ítøkilig nýtsla verður sett í verk og heimasíður ella líknandi verða gjørdar, treytað av, hvat økisnavnið skal nýtast til.

Skrásetarar, sum longu hava skrásett eitt økisnavn, áðrenn brúksskylda verður sett í gildi, eiga at fáa eina rímuliga tíðarfreist til at seta viðkomandi tiltøk í verk fyri at taka økisnavnið í brúk samsvarandi treytunum um brúksskyldu í handilstreytunum. Í § 24, stk. 2 er ásett, at handilstreytir, sum koma í gildi eftir, at lógin er komin í gildi, eisini verða galdandi fyri tey, sum hava skrásett økisnøvn innan gildiskomu lógarinnar. Hóast hesa áseting eiga tey, sum hava skrásett økisnøvn, áðrenn ein møgulig brúksskylda verður sett í gildi, at fáa møguleika til, innan eina rímuliga freist, at skipa viðurskiftini sambært nýggju treytunum um brúksskyldu.

Til stk. 1, nr. 2

Umsitari kann, sum eitt annað dømi, áseta handilstreytir um rættin til at skráseta og nýta økisnøvn, undir hesum til dømis reglur um gjøld og leingjan av rættinum til eitt økisnavn, uppsagnarmøguleika, uppsøgn hjá brúkara av rættinum til eitt økisnavn, avhending av rættinum til eitt økisnavn, redelegering, umsitingarligar broytingar, almannakunngering av upplýsingum, trygging av navnatænastu (bíðilisti, mannagongd í sambandi við upptøku á bíðilista) og ábyrgdaravsøgn.

Til stk. 1, nr. 3

Skotið verður upp, at umsitari t.d. ásetur handilstreytir um møguleika hjá umsitara at strika eitt økisnavn, heruppií tá talan er um slítingarhøvi hjá sáttmálapørtum.

Í sambandi við striking av økisnøvnum kann umsitari ikki gera mismun á skrásetarum ella nýta ósaklig metingarstøði. Tí skulu reglur um striking týðiliga síggjast aftur í handilstreytunum hjá umsitara.

Á sama hátt sum í dag fær umsitari møguleika fyri at áseta handilstreytir og treytir annars, sum gera tað gjørligt at strika økisnøvn, um avtalutreytir ikki eru hildnar og sum natúrlig fylgja av, at talan er um avtalurættarlig viðurskifti millum umsitara og skrásetaran.

Harafturat kann umsitari til dømis áseta reglur um, at avtaluviðurskifti skulu kunna halda uppat og økisnavnið verða strikað í teimum førum, tá økisnavnið verður nýtt í andsøgn við góðan økisnavnasið, og tá talan er um hamstring bert við víðarisølu ella útleigan við vinningi fyri eyga, sbr. § 13, stk. 2 í uppskotinum.

Umsitari kann ikki av sínum eintingum seta avtalu við skrásetara úr gildi og strika økisnavnið grundað á eitt nú, at skrásetari hevur framt brot á meginregluna um góðan økisnavnasið. Avtalan við skrásetaran kann fara úr gildi, grundað á ein dóm frá dómstólunum. Eisini kunnu avtaluviðurskifti eyðsæð sigast upp, um brot verður framt á aðra lóggávu, ella rættindi hjá triðjaparti verða skúgvað til viks.

Verður eitt økisnavn strikað í almenningsins áhuga, skulu týðandi orsakir liggja til grund fyri at strika økisnavn, sum skrásetari hevur tikið í nýtslu. Regla um striking í almenningsins áhuga skal síggjast aftur í regluverkinum hjá umsitara. Um umsitari frammanundan í almenningsins áhuga avger, at ein rød av økisnøvnum ikki kann skrásetast, kann umsitari til tess at skapa gjøgnumskygni, almannakunngera eitt yvirlit yvir hesi økisnøvn.

Ásetingin í stk. 2 staðfestir, at umsitari tekur avgerð viðvíkjandi skrásetarum sambært teimum handilstreytum og treytum annars, sum umsitari ásetur sambært stk. 1. Hetta merkir ikki, at umsitari frammanundan skal tryggja sær, at allar ásetingar í galdandi handilstreytum og treytum annars verða hildnar. Tvørturímóti, so er tað ein meginregla í uppskotinum, at økisnøvn kunnu verða skrásett uttan individuella góðkenning frá umsitara frammanundan.

Umsitari handhevjar eina rød av handilstreytum og treytum annars viðvíkjandi gjaldi, avleiðingum av vantandi gjaldi v.m. Sama er galdandi viðvíkjandi handilstreytum og øðrum treytum, ið veita trygd fyri, at reglurnar verða hildnar, tá sjálvvirkandi skrásetingin av økisnøvnum verður evnað til. Hetta kann gerast við, at tað tøkniliga verður forðað fyri møguleikanum at stovna ávís økisnøvn á netinum.

Í stk. 3 er ásett, at handilstreytirnar sambært stk. 1 mugu ikki stríða ímóti góðum økisnavnasiði. Umsitari skal syrgja fyri, at proportionalitetur er í mun til endamálið. Handilstreytir skulu ásetast á ein objektivan hátt, soleiðis at einstakir ella bólkar av skrásetarum ikki verða fyri mismuni. Í § 13 í lógaruppskotinum eru nevnd serliga tvey viðurskifti (góður økisnavnasiður og forboð fyri skráseting av økisnøvnum, ið hava útleigan ella víðarisølu fyri eyga) og í § 8, stk. 1 eru nevnd trý dømi, sum venda sær móti skrásetarum og kunnu sigast at hava inntrívandi eyðkenni. Umsitara kann sambært § 8, stk. 1 áseta fleiri ella líknandi handilstreytir enn tær, ið ganga fram av § 8, stk. 1, nr. 1-3, sum umsitari metir vera viðkomandi, tó mugu tær ikki stríða ímóti regluni um góðan økisnavnasið.

Til tess at tryggja gjøgnumskygni verður í stk. 4 skotið upp, at skjøl v.m., sum hava beinleiðis týdning fyri verandi og komandi skrásetarar, skulu vera alment atkomulig á heimasíðuni hjá umsitara. Umframt hetta kann til dømis verða ásett sum minstakrav, at umsitari skal tryggja gjøgnumskygni, ið svarar til meginreglurnar í fyrisitingarlógini.

Við stk. 5 verður tryggjað, at umsitari kunnar alment um týðandi broytingar í handilstreytunum og um onnur viðurskifti, sum hava týdning fyri skráseting og nýtslu av økisnøvnum, áðrenn hesar koma í gildi. Á tann hátt kunnu onnur, undir hesum einstaklingar, við áhuga fyri menning av internetsamfelagnum, fylgja við og seta dám á virksemið hjá umsitara umvegis kunning um broytingar í handilstreytum og onnur viðkomandi viðurskifti, sum hava týdning fyri skráseting og nýtslu av økisnøvnum.

Gjøgnum opinleika kunnu borgarar, tey, sum ynskja at skráseta eitt økisnavn, miðlar og myndugleikar v.m. fylgja við í mannagongdunum og gongdini í umsitingini og við støði í hesum geva møguligt íkast til umsitara.

Til § 9

Í stk. 1 verður skotið upp, at umsitari samsvarandi WHOIS ásetingunum hjá ICANN skal stovna ein dátugrunn. Dátugrunnurin skal tryggja, at umsitari kennir samleikan hjá skrásetarunum. Samstundis skal dátugrunnurin viðvirka til, at onnur kunnu fáa upplýst, hvør stendur aftanfyri eitt økisnavn. Dátugrunnurin skal soleiðis vera til taks til tess at hjálpa brúkarunum við at finna upplýsingar, sum viðvíkja økisnøvnum.

Sambært stk. 2 skulu upplýsingarnar hjá skrásetara vera rættar í øllum skrásetingartíðarskeiðinum. Skotið verður upp, at umsitari skal tryggja, at upplýsingarnar viðvíkjandi navni, telduposti og telefonnummari hjá skrásetara, sbr. stk. 1, eru rættar, og í hesum liggur, at tær eisini skulu vera dagførdar. Upplýsingarnar skulu sambært ásetingini vera atkomuligar í tann mun, tað er tøkniliga gjørligt og rímiligt, m.a. sambært altjóða *best practice* á økinum.

Í stk. 3 verður skotið upp at áleggja umsitara at almannakunngera WHOIS upplýsingar á heimasíðu umsitarans um skrásetingardag, útgongudag og seinastu dagføring.

Sambært stk. 3 upplýsir umsitari ikki beinleiðis, hvør eigarin av økisnavninum er. Kortini eigur at bera til at seta seg í samband við skrásetaran, t.d. umvegis eitt leinki á heimasíðu umsitarans.

Sambært stk. 4 skal umsitari tryggja, at skrásetarar kunnu fáa upplýsingar fjaldar um navn, bústað og telefonnummar í dátugrunninum, um so er at upplýsingarnar eru undantiknar innliti sambært aðrari lóggávu, heruppií løgtingslóg um fólkayvirlit. Endamálið við ásetingini er at tryggja, at upplýsingar um skrásetarar ikki verða alment atkomuligar, um tær sambært aðrari lóggávu eru undantiknar frá almannakunngerð.

Umsitari skal tryggja, at upplýsingarnar í stk. 1 ikki verða alment atkomuligar í dátugrunninum, um upplýsingarnar sambært aðrari lóggávu eru undantiknar innliti. Umsitari skal almannakunngera, hvørji atkomulig yvirlit ella skráir umsitari hevur atgongd til og nýtir, tá upplýsingar verða undantiknar og ikki almannakunngjørdar. Hesar upplýsingar skulu m.a. vera atkomuligar fyri skrásetarar í skrásetingartilgongdini og í sambandi við broyting av

skrásetaraupplýsingum fyri at tryggja, at skrásetari veit, um viðkomandi av egnum ávum skal biðja um, at upplýsingar ikki verða almannakunngjørdar.

Umsitari skal eftir umbøn frá skrásetara tryggja, at upplýsingar, sum sambært aðrari lóggávu eru undantiknar frá innliti, ikki verða almannakunngjørdar í dátugrunninum í teimum førum, tá hetta ikki kann verða staðfest av skrásetara av egnum ávum, tá sligið verður upp í alment atkomuligum yvirlitum.

Møguleikin fyri at fáa undantikið upplýsingar frá at verða almannakunngjørdar í dátugrunningum fevnir um skrásetarar í Føroyum, umframt skrásetarar búsitandi í øðrum londum. Tað áliggur skrásetara at prógva, at hann hevur rætt til navna- og bústaðarvernd sambært lóggávuni í tí landinum, har skrásetari er búsitandi.

Í stk. 4, 2. pkt. er ásett, at upplýsingar tó kunnu latast víðari, um hetta er krav sambært aðrari lóggávu. Her verður hugsað um eitt nú løgregluna ella annan myndugleika, sum hevur krav upp á upplýsingarnar sambært aðrari lóggávu.

Til § 10

Eitt yvirskipað endamál við lógini er at fáa til vegar trygd á internetinum. Til tess at skrásetarar og aðrir brúkarar av internetinum hava álit á økisnavnaskipanini og skrásetingini, skal umsitari syrgja fyri, at raksturin og internetsambandið eru dygdargóð.

Umsitari skal tí sambært stk. 1 tryggja støðugan, tryggan og óslitnan rakstur av og samband við navnaambætararnar fyri økisnavnið .fo. Í tekniskum høpi hevur hetta við sær, at sett verður í verk eitt trygt samband, sum er grundað á TCP/IP-protokollina millum teir navnaambætarar hjá umsitara, ið verða fráboðaðir av skipanini av rótambætarum (rodservere) og internetið.

At tryggja sambandið merkir eitt støðugt, trygt og óslitið samband við teirri dygd, sum er kend í internetsamfelagnum, har tað ikki er gjørligt at tryggja eitt støðufast 100% røkkandi samband.

Ásetingin hevur við sær, at umsitari altíð og í mest møguligan mun fylgir tøkniligum standardum og mannagongdum, sum eru ella verða samtyktar á altjóða støði í tónagevandi felagsskapum. Tað ber ikki til at staðfesta frammanundan, hvørjir felagsskapir eru tónagevandi í hesum sambandi. Fyri tíðina fyriferst ein týðandi partur av hesum arbeiði í Internet Corporation for Assigned Names and Numbers (ICANN), Internet Assigned Numbers Authorithy (IANA), Governmental Advisory Committee (GAC), Domain Name System (DNS), Root Server System Advisory Committee (RSSAC) og The Internet Engineering Taskforce (IETF).

Tá talan er um óvanligar umstøður, skal umsitari hava tilbúgvingingarætlan, sum tryggjar varðveitslu og framhald av umsitingini, men eisini møguleika fyri at útiloka ella steingja fyri nýtslu. Eisini kann onnur lóggáva seta onnur tilbúgvingarkrøv.

Sambært stk. 2 skal umsitari hava ein trygdarpolitikk fyri økið, sum eigur at verða viðlíkahildin soleiðis, at trygdarpolitikkurin fylgir gongdini á internetøkinum, sbr. stk. 1 omanfyri.

Í stk. 3 er ásett, at umsitari skal gera avtalu við triðjapart um KT-grannskoðan og varðveitslu av øllum upplýsingum frá navnadátugrunninum og navnaambætaradátugrunninum.

Skyldan hjá umsitara hevur eisini við sær eina tapavmarkingarskyldu í mun til skrásetarar í tí føri, brek er v.m. Trygdarfílur skulu lesast inn á ein miðil, sum ikki ber til at redigera.

Ásetingarnar eru við til at tryggja, at viðkomandi upplýsingar eru atkomuligar hjá umsitara og møguligum triðjaparti, sum tekur sær av at skráseta økisnøvn. Umsitari skal dagliga senda avrit av dátugrunnunum til varðveitslueindina.

Viðmerkjast skal í hesum sambandi, at verandi umsitari hevur gjørt avtalu við Elektron um KT-grannskoðan og varðveitslu av øllum upplýsingum frá navnadátugrunninum og navnaambætaradátugrunninum. Trygdareintøk verða send Elektron dagliga.

Í stk. 4 verður heimilað landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um innihaldið í trygdarpolitikkinum, heruppií trygdarkrøv og -standardar, krøv til kt-grannskoðan, krøv um at ávísar skráir bert mugu goymast í einum góðkendum landi o.a.

Sambært lógaruppskotinum hevur Fjarskiftiseftirlitið eftirlit við lógini og ansar m.a. eftir, at umsitari hevur gjørt veruliga avtalu um varðveitslu og kt-grannskoðan.

Umsitari skal sambært stk. 5 senda Fjarskiftiseftirlitinum avrit av avtalunum um varðveitslu og kt-grannskoðan.

Til § 11

Umsitari hevur ábyrgdina av at røkja dagligu umsitingina, undir hesum tøkniliga raksturin av økinum. Umsitari kann sjálvur standa fyri allari umsitingini ella við heimild í ásetingini í stk. 1 bjóða út alla ella partar av umsitingini.

Hevur umsitari útveitt alla umsitingina ella partar av hesi til ein ella fleiri undirveitarar, verður ikki sambært lógaruppskotinum sett krav um, at tað er sami undirveitari, sum heldur fram alt tilnevningartíðarskeiðið.

Uppskotið ásetur, at øll ella partar av umsitingini kunnu verða útveitt og latin undirveitara upp í hendi.

Í stk. 2 er krav um, at í tí føri umsitingin verður heilt ella partvíst bjóðað út, skal umsitingin røkjast samsvarandi ásetingunum í lógini og handilstreytum og skyldum, ið eru ásettar sambært hesum. Samstundis verður staðfest, at tað er umsitari, ið hevur ábyrgdina av at tryggja, at umsitingin er í samsvari við lógina.

Til § 12

Skráseting av økisnøvnum hoyrir sum meginregla undir virksemi umsitarans. Umsitari kann eftir ásetingini í stk. 1 útveita allar ella partar av skrásetingarmannagongdini, heruppií

handfaring av umsóknum og broytingar vegna umsøkjarar og skrásetarar, til ein tiðjapart, ið tekur sær av at skráseta økisnøvn. Endamálið við ásetingini er at skapa møguleika fyri, at umsitingin av .fo kann halda fram, sum hon ger í dag.

Stk. 2 tryggjar gjøgnumskygni og harvið møguleika at síggja, hvør er góðkendur at standa fyri skráseting av økisnøvnum vegna umsitara.

Í stk. 3 verður skotið upp, at umsitari fær heimild til at áseta nærri handilstreytir og treytir annars fyri skrásetaravirksemið. Við hesi áseting kunnu viðurskiftini viðvíkjandi umsitingini av .fo halda fram, sum tey eru í dag. Herumframt fer umsitari til dømis at kunna áseta handilstreytir ella treytir annars fyri skráseting, nýtslu, suspensión, avhending og afturtøku.

Umsitari kann harafturat, sum partur av politikkskapandi virkseminum, gera yvirskipaðar leiðreglur fyri góða siðvenju á økinum.

Í § 13 í lógaruppskotinum eru nevnd serliga tvey viðurskifti, ið viðvíkja góðum økisnavnasiði og forboð fyri skráseting av økisnøvnum, ið hava útleigan ella víðarisølu fyri eyga. Tá handilstreytir og aðrar treytir skulu gerast, skal umsitari syrgja fyri, at proportionalitetur er í mun til endamálið. Handilstreytir og treytir annars skulu ásetast á ein objektivan hátt, soleiðis at einstakir ella bólkar av skrásetarum ikki verða fyri mismuni.

Til § 13

Sambært stk. 1 hava tey, sum skráseta økisnøvn, eina vanliga skyldu at vísa sømiligan atburð samsvarandi góðum økisnavnasiði. Ásetingin er at meta sum ein aðaltreyt. Ætlanin er, at rættarøkið við hesum verður broytt gjøgnum einstøk mál, ið, sum frálíður, skapa siðvenju, har tey virði, sum eru mett at hava týdning fyri viðkomandi øki, verða endurspeglað.

Við orðinum *skrásetari* verður sipað til tann, ið til eina og hvørja tíð er skrásettur sum eigari av økisnavninum, uttan mun til um viðkomandi sjálvur hevur staðið fyri fyrstu skrásetingini ella hevur fingið økisnavnið við avtalu, arvi ella aðrari suksesjón. Harafturat er tann fysiski ella løgfrøðiligi persónurin, sum ætlar at skráseta eitt økisnavn, í ávísum førum at meta sum skrásetari sambært ásetingini. Kravið um at halda góðan økisnavnasið, er tí galdandi bæði fyri skráseting, nýtslu, marknaðarføring, avhendan, útinning og frásøgn av økisnøvnum.

Tað hevur sostatt ikki verið ætlanin at gera avmarkingar fyri, hvørjar hendingar viðvíkjandi skráseting og nýtslu av økisnøvnum kunnu verða fevndar av skylduni at fylgja góðum økisnavnasiði.

Tey viðurskifti, sum verða tikin við í metingini av góðum økisnavnasiði, snúgva seg ikki bert um skrásetingardagin, men eisini um tíðarskeiðið eftir, at økisnavnið er skrásett.

Somuleiðis verður ásetingin eisini at galda fyri ein og hvønn eftirfylgjandi eigara av økisnavni. Eisini tann, sum yvirtekur eitt longu skrásett økisnavn, skal soleiðis fylgja reglunum um góðan økisnavnasið.

Tá kravið um góðan økisnavnasið verður sett í verk í praksis, kunnu ein rød av ósambæriligum atlitum koma fyri, sum mugu metast upp ímóti hvørjum øðrum. Í lógini er

eingin raðfesting av hvørji atlit, ið viga tyngst, men letur tað vera upp til dómstólarnar at gera hesa meting.

Hóast reglan um góðan økisnavnasið ofta er ætlað privatum skrásetarum, eru áhugamálini við hesum ikki vigað til fyrimuns fyri privata skrásetaran. Handilslig og samfelagslig viðurskifti kunnu í nøkrum førum viga tyngri.

Eins og vit kenna tað frá skipanunum í grannalondunum skulu ymisk atlit verða tikin við í metingina av góðum økisnavnasiði, heruppií atlit til samfelagsliga virðið í nýtsluni, atlit til møguleikan fyri at koma til orðanna, samanhangur millum økisnavn og veruligu og ætlaðu nýtsluna (tøkniligu, aktivt ella passivt), virðið av økisnavninum fyri ávikavist skrásetara og triðjapersón, viðurskifti áðrenn og aftaná skrásetingina, sum eru viðkomandi fyri metingina, um tað er ósømiligt, um tað er í ósamsvari við aðra lóggávu o.a. Harafturat kunnu atlit til tíðarbundin viðurskifti í málinum somuleiðis vera viðkomandi at taka við í metingina av góðum økisnavnasiði, heruppií eitt nú, um sýnt er rættstundis umhugsni viðvíkjandi skrásetingini av viðkomandi økisnavni.

Í stk. 2 er skotið upp at seta forboð fyri at skráseta og varðveita skráseting av økisnøvnum, um hetta bert er við víðarisølu ella útleigan fyri eyga. Tað merkir, at viðkomandi skrásetari ikki hevur sum endamál at nýta hesi sjálvur, men bert fyri at selja hesi víðari til persónar, fyritøkur, stovnar v.m., ið t.d. hava rakstrarbúskaparlig, persónlig ella egin privat áhugamál í júst hesum økisnavninum.

Talan er vanliga um, at slík skráseting er gjørd av skrásetarum, ið hava verið framskygdir og frammanundan hava sæð fyri sær, at aðrir skrásetarar fóru at hava serligan áhuga í viðkomandi økisnavni, og at tann fyrstnevndi hevur verið kvikast at skráseta navnið. Ofta verður hugtakið “warehousing” nýtt um tílíkar skrásetingar.

Skotið verður upp, at ásetingin hevur eitt avmarkað virkisøki, og at hon einans verður nýtt í teimum førum, tá skrásetingin er framd við víðarisølu ella útleigan fyri eyga.

Økisnøvn kunnu tí ikki skrásetast við víðarisølu fyri eyga, har tann, sum selur økisnavnið víðari (fyrrverandi skrásetarin), fær fíggjarligan vinning, antin víðarisølan er fullkomin ella partvís, fyribils ella endalig.

Tað, ið hevur týdning, er, um endamálið við skrásetingini og víðarisøluni hevur verið at fáa fíggjarligan vinning. Hava tað verið onnur endamál enn fíggjarligur vinningur við skrásetingini av økisnavninum, er ásetingin ikki viðkomandi.

Tað er ikki endamálið við ásetingini at raka skrásetara, ið skrásetur sum liður í einum fulltrúviðurskifti. Til dømis er eitt lýsingarvirki, sum í sambandi við ítøkiliga uppgávu hevur skrásett fleiri nøvn, ið kundin ætlandi skal yvirtaka, ikki fevnt av forboðnum. Ítøkilig meting av viðurskiftunum hjá fulltrúveitara er avgerandi fyri, hvørt ásetingin gerst virkin.

Tað er ikki ætlanin, at ásetingin skal raka skrásetarar, sum um tað mundið, skrásetingin varð gjørd, høvdu ætlanir um at selja víðari ella útleiga, men seinni sjálvir eru farnir undir veruliga

nýtslu av økisnavninum. Í tílíkari støðu kann skrásetari selja økisnavnið uttan at verða fevndur av forboðnum.

Tað er heldur ikki ætlanin, at ásetingin skal forða fyri útleigan av undirøkisnøvnum. Í hesum sambandi kunnu vera fleiri atlit, ið eiga at verða tikin til ymsu økini, sum eru fevnd av lógini. Spurningurin verður tí viðgjørdur í handilstreytunum.

Á sama hátt, sum galdandi er í stk. 1, fevnir stk. 2 ikki bert um framferðina skrásetingardagin, men um allar framferðir eftir, at økisnavnið er skrásett.

Til § 14

Við ásetingini í stk. 1 verður tryggjað, at umsitingin í mest møguligan mun kann halda fram ótarnað, tá umsitingin verður latin nýggjum umsitara.

Sambært ásetingini er ein generell skylda løgd á umsitara at tryggja, at ein nýggjur umsitari skal kunna halda fram, so skrásettu økisnøvnini framhaldandi eru atkomulig.

Útskifting av umsitara kann fara fram eitt nú í sambandi við umsitarans uppathald, sum fylgja av at loyvistíðarskeiðið rennur út, umsitari letur loyvið inn aftur ella í sambandi við afturtøku av loyvinum sambært § 22, stk. 1.

Endamálið er at tryggja, at útskiftingin av umsitara hevur so fáar avleiðingar fyri skrásetararnar sum gjørligt. Tað vil millum annað siga, at umsitarin higartil í sambandi við uppathaldið skal taka neyðug stig til at tryggja eina smidliga yvirgongd ella útskifting.

Í sambandi við umsitarans uppathald verður í stk. 2 skotið upp at áleggja umsitara, undir hesum møguligum skrásetara, at lata allar viðkomandi upplýsingar um avtaluviðurskifti, ið umsitari ella møguligur skrásetari hevur við skrásettu, til nýggja umsitaran uttan viðurgjald.

Endamálið er at tryggja, at umsitingin í mest møguligan mun kann halda fram ótarnað í nýggjum høpi og uttan ampa fyri verandi og komandi skrásetarar.

Atgongdin til upplýsingar um avtalur og dátugrunnar er neyðug til tess at kunna halda fram sum umsitari undir varðveitslu av verandi skrásetingum av økisnøvnum.

Skrásettu sleppa við hesum undan rakstrarligum trupulleikum í skiftinum til ein nýggjan umsitara.

Í stk. 3 er ásett, at verandi avtalur við skrásetarar verða latnar tí nýggja umsitaranum, um umsitari kemur undir trotabúsviðgerð.

Ynskið um at tryggja umsitingina undir einum nýggjum umsitara, undir hesum eisini um Fjarskiftiseftirlitið yvirtekur umsitingina, kann vera trupul, um trotabúgvið eftir undanfarnan umsitara kann seta treytir um útflýggjan av upplýsingunum, ið umrøddar eru í ásetingini. Hetta merkir, at verandi avtalur ikki eru at meta sum ognir (aktiver) í møguligum trotabúgvi umsitarans. Skotið er upp, at verandi avtaluviðurskifti verða latin nýggja umsitaranum, ið gongur inn í hesi avtaluviðurskifti, sbr. stk. 4. Ynskið um at tryggja umsitingina undir einum nýggjum umsitara, undir hesum eisini um Fjarskiftiseftirlitið yvirtekur umsitingina, kann vera trupult, um trotabúgvið eftir undanfarnan umsitara kann seta treytir um útflýggjan av upplýsingunum, ið umrøddar eru í ásetingini.

Ásetingin hevur við sær, at bústjórin í trotabúnum (kurator) ikki kann seta krav um gjald sum treyt fyri avhendan/útflýggjan av viðkomandi upplýsingum, og rætturin, sum búgvið kann hava at ganga inn í avtaluna sambært reglunum í konkurslógini, verður settur úr gildi.

Við avmarkingunum, ið fylgja av ásetingini, eru reglurnar í konkurslógini galdandi. § 55 í konkurslógini um inngongurætt trotabúsins er tó ikki galdandi, um umsitari fer á húsagang.

Sambært stk. 4 gerst ein nýggjur umsitari partur í teimum avtalum, sum fyrrverandi umsitari hevur gjørt við skrásetarar av økisnøvnum, ið eru fevnd av umsitingini, við virknaði frá yvirtøkutíðspunktinum, ið er ásett í loyvinum, sum verður givið sambært § 4, stk. 2, avgerð sambært § 22, stk. 2 ella reglum, ásettar við heimild í § 3, stk. 2, nr. 4. Tann fyrrverandi umsitarin verður leysur av sínum skyldum sambært hesum avtalum frá yvirtøkutíðspunktinum.

Sambært ásetingini verður nýggi umsitarin ella Fjarskiftiseftirlitið, um stovnurin fyribils yvirtekur umsitingina, partur í teimum avtalum, sum fyrrverandi umsitari hevur gjørt við skrásetarar av økisnøvnum. Verandi avtalur kunnu bæði verða gjørdar millum ein umsitara og ein skrásetara og ein skrásetara og ein skrásettan, og alt eftir, hvussu umsitari hevur valt at skipa umsitingina, sbr. §§ 10 og 11.

Gjørdar avtalur um økisnøvn detta ikki burtur í sambandi við, at nýggjur umsitari tekur við. Rætturin til økisnavnið er í útgangsstøði ikki tíðaravmarkaður. At nýggjur umsitari gerst partur í avtalunum viðvíkur einans tí parti av avtaluni, sum viðvíkur skráseting av økisnavninum. Aðrar veitingar, sum eitt nú kunnu vera ein partur av eini avtalu millum ein skrásetara og fyrrverandi umsitara ella ein skrásetara og skrásettan, eru hinvegin ikki fevndar av skyldum ella rættindum, sum ásetingin í stk. 4 áleggur einum nýggjum umsitara. Frá og við yvirtøkutíðspunktinum fær einstaki skrásetti í staðin fyri fyrrverandi umsitara ein nýggjan umsitara sum veitara. Ásetingin í stk. 4 gevur skrásetta eina trygd fyri framhaldandi rakstri av økisnavnaskipanini. At skipanin er soleiðis sett saman hevur við sær, at tað ikki er nakar veruligur vandi fyri, at tann avtalan, sum skrásetti hevur gjørt við fyrrverandi umsitara, ikki verður yvirhildin.

Tað hevði verið til stóran ampa og týðandi kostnað, um hvør einstakur skrásettur, í sambandi við útskifting av umsitara, skuldi givið sítt samtykki. Skrásett hava harvið rætt til at verða verandi skrásett hjá einum nýggjum umsitara eftir somu treytum, sum higartil. Nýggi umsitarin kann tó sambært § 15 broyta handilstreytirnar og treytirnar annars fyri tey skrásettu.

Ásetingin í stk. 1 snýr seg einans um avtalur, ið hava við skráseting av økinøvnum at gera. Ásetingin snýr seg eitt nú ikki um møguligar avtalur hjá umsitara við løntakarar, avtalur um leigumál, innbúgv o.tíl. Hetta forðar tó ikki fyri, at ein nýggjur umsitari ger avtalu við fyrrverandi umsitara um at yvirtaka leigumál o.a.

Til § 15

Ásetingin regulerar avtalurættarlig viðurskifti millum umsitara og skrásetara í sambandi við avhending av umsitingini av økisnøvnum á internetinum frá einum umsitara til ein annan.

Ásetingin gevur nýggja umsitaranum ein serligan rætt í sambandi við umsitaraskifti at broyta avtalutreytirnar í verandi avtalu við skrásetarar. Skotið verður soleiðis upp, at nýggi umsitarin við virknaði frá yvirtøkudegnum kann áseta nýggjar handilstreytir og treytir annars fyri verandi avtalur um skráseting av økisnøvnum undir viðkomandi landaøki.

Handilstreytir umsitarans eru vanliga ein partur av avtaluviðurskiftunum millum ein skrásetara og umsitara. Skotið verður upp, at nýggi umsitarin við virknaði frá yvirtøkudegnum eisini fær ein serligan rætt til at áseta nýggjar handilstreytir fyri skráseting

av økisnøvnum undir viðkomandi landaøki. Við ”yvirtøkudegnum” verður sipað til tíðspunktið (ítøkiliga dagin), tá loyvið til at umsita eitt landaøki (internetdomæne) er galdandi frá.

Ásetingin hevur til endamáls at tryggja, at tann nýggi umsitarin ikki er bundin av handilstreytum og treytum annars hjá undanfarna umsitara, sbr. § 14, stk. 4.

Í sambandi við eitt umsitaraskifti hevur tað týdning fyri umsitaran, ið tekur við, at hesin hevur møguleika at áseta sínar handilstreytir og treytir annars, sum galdandi eru frá byrjanini av tilnevningartíðarskeiðinum.

Talan er um, at umsitari hevur eitt val, hvørt hann ynskir at áseta nýggjar handilstreytir ella treytir annars.

Ásetingin forðar ikki fyri, at umsitari eitt nú í sambandi við endurtilnevning velur ikki at broyta sínar treytir. Ásetingin forðar ikki umsitara í, við vanligum varningi v.m., at broyta handilstreytir og treytir annars í umsitaratíðaraskeiðinum.

Til § 16
Sambært ásetingini verður tað ásett í viðtøkunum, sum landsstýrismaðurin góðkennir, sbr. § 7, stk. 2, hvussu virksemið hjá umsitara verður avtikið, tá umsitari heldur uppat.

Til § 17
Sambært ásetingini kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um tilgongdina o.a. í sambandi við at søkt verður um økisnøvn, sum á annan hátt eru knýtt at Føroyum, og áseta reglur og treytir fyri hesi økisnøvn. Í hesum sambandi kann hann eitt nú áseta reglur um møguliga luttøku hjá Fjarskiftiseftirlitinum í tilgongdini, tá søkt verður um nýggj økisnøvn, og reglur og treytir knýtt at hesum økisnøvnum.

Ásetingin er rættarliga grundarlagið fyri, at áhugmálini hjá Føroyum kunnu røkjast í framtíðini í mun til økisnøvn, sum á annan hátt eru knýtt at, ella verða knýtt at Føroyum. Ásetingin fevnir ikki um økisnøvn, ið eru tillutað Føroyum.

Orsøkin til ásetingina er, at ICANN tann 20. juni 2011 tók avgerð um, at søkjast kann um tillutan av eini røð av “topdomæner”. Í núgaldandi leiðreglum hjá ICANN er ásett, at umsóknir um økisnøvn við landafrøðiligum nøvnum skulu hava eitt sonevnt ikki-mótmæli ella eina váttan um stuðul frá viðkomandi stjórn ella almenna myndugleika. Økisnavnið kann bert verða tillutað einum umsøkjara, sum lýkur hetta kravið og onnur krøv í leiðreglunum hjá ICANN. Hetta er eisini galdandi fyri økisnøvn við einum landafrøðiligum navni, sum hevur tilknýti til Føroyar. Harvið hevur landið ávísa ávirkan á umsóknir um økisnøvn, sum ikki serstakt verða tillutað Føroyum, men á annan hátt eru knýtt at Føroyum. Hetta er galdandi eftir núgaldandi reglum hjá ICANN, og ringt er at meta um, hvønn leiklut londini frameftir skulu hava eftir reglum hjá ICANN. Tí verður skotið upp, at landsstýrismaðurin fær heimild til at áseta nærri reglur um hetta í kunngerð.

Eftir ásetingini kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglum um eitt nú, at Fjarskiftiseftirlitið kann geva eina váttan um ikki-mótmæli móti, at ICANN tillutar einum umsøkjara eitt

landafrøðiligt økisnavn. Við heimild í ásetingini kunnu reglur ásetast um, at áhugapartar og myndugleikar skulu takast við upp á ráð ella verða hoyrdir, áðrenn reglur ella treytir verða ásettar fyri økisnøvn, sum á annan hátt eru knýtt at Føroyum.

Eitt annað endamál við heimildini er, at landsstýrismaðurin skal hava heimild til at áseta reglur og treytir samsvarandi tí ávirkan, sum Føroyar fáa tillutað í sambandi við ávíst økisnavn, og tær avmarkingar, ið kunnu vera í tí sambandi.

Økisnøvn, sum á annan hátt eru knýtt at Føroyum, eru ikki ogn hjá landinum. Avmarkingar eru tí í, hvørja ávirkan og ræði tað almenna hevur viðvíkjandi økisnavninum, og tað er avmarkað, hvørjar reglur og treytir kunnu setast. Av tí sama eru økisnøvn, sum á annan hátt eru knýtt at Føroyum, ikki fevnd av lógini í síni heild. Heilt ítøkiliga eru hesi økisnøvnini ikki fevnd av kap. 2-5 í lógini, ið bert fevna um økisnavnið .fo og møgulig onnur økisnøvn, sum verða tillutað Føroyum.

Harvið eru ikki serstøk krøv galdandi sambært føroyskari lóggávu til umsitingina av nýggjum økisnøvnum við landafrøðiligum nøvnum, sum hava tilknýti til Føroyar. Slík økisnøvn verða fevnd av reglunum hjá ICANN. Innanfyri hesar karmar kann tað tó vera ynski um, at landsstýrismaðurin ásetur treytir ella avmarkingar fyri økisnøvn, sum á annan hátt eru knýtt at Føroyum. Tað hevur týdning fyri, hvørji krøv landsstýrismaðurin kann áseta, at ICANN hevur tillutað Føroyum rætt til at kunna ávirka umsitingina av økisnavninum. Tað merkir, at tað bert er innan fyri teir karmar, sum ICANN hevur givið føroyskum myndugleikum heimild til at áseta reglur og treytir.

Tað er ikki møguligt frammanundan at seta avmarkingar fyri, hvørjar reglur og treytir kunnu ásetast eftir ásetingini, tí tað er avgerandi, hvørja ávirkan Føroyar fáa tillutað. Heimildin er neyðug fyri at tryggja dynamikk og fleksibilitet, so rúmd verður fyri framtíðar menningini, sum er á økinum, og frammanundan er trupul at spáa um.

Umframt at áseta reglur um luttøkuna hjá almennum myndugleikum í sambandi við umsókn til ICANN kunnu eisini reglur ásetast, sum hava til endamál at forða fyri skráseting av økisnøvnum, ið kunnu føra við sær ein vanda fyri, at økisnavnið eitt nú verður mistikið fyri at vera ein almennur myndugleiki, sum skal samskifta við borgaran ella umsita almennar uppgávur.

Til § 18
Sambært ásetingini í stk. 1 hevur Fjarskiftiseftirlitið eftirlit við, at lógin og reglur, ásettar við heimild í lógini, umframt treytir, ásettar í loyvum, sum eru givin sambært lógini, verða yvirhildnar.

Eftirlitið verður útint eftir eina klagu, ella tá eftirlitið sjálvt metir, at eftirlit skal fara fram. Eftirlitið hjá Fjarskiftiseftirlitinum kann hava við sær, at avgerð verður tikin um, at reglur, loyvir, treytir o.a. ikki eru yvirhildin, og møguliga áleggja umsitara at taka ítøkilig stig ella broytingar fyri at lógin o.a. kann verða yvirhildin.

Sambært ásetingini í stk. 2 kann Fjarskiftiseftirlitið geva umsitara boð, um umsitari ikki yvirheldur ásetingarnar í lóggávuni og treytir í loyvum, ið eru givin sambært lógini.

Við heimild í stk. 3 kann Fjarskiftiseftirlitið krevja allar upplýsingar og tilfar frá umsitara, sum verða mett viðkomandi í sambandi við umsiting og eftirlit sambært lógini. Ítøkiliga

verður nevnt, at eftirlitið kann krevja útgreiningar í sambandi við roknskaparuppsetanina, uppgerð av marknaðarpørtum, nettosølu, gjaldsfreistir o.a. Talan er ikki um eina úttømandi uppreksan av upplýsingum, sum eftirlitið kann krevja. Einasta treyt er, at talan skal vera um upplýsingar, sum eru viðkomandi í sambandi við umsiting og eftirlit sambært lógini.

Ásetingin í stk. 4 er einans viðkomandi, tá talan er um útskifting av umsitara sambært § 14, stk. 2 í lógini. Í § 14, stk. 2 í lógini er ásett, at umsitari kostnaðarfrítt skal geva nýggjum umsitara allar upplýsingar um verandi avtalur við skrásetarar og aðrar upplýsingar, sum eru viðkomandi til tess at yvirtaka og reka virksemið víðari. Í stk. 4 er ásett ein heimild til Fjarskiftiseftirlitið at taka avgerð í málum, har ósemja ella ivamál er um, hvørjar avtalur ella upplýsingar eru viðkomandi hjá einum umsitara at lata einum nýggjum umsitara sambært § 14 í lógini.

Til § 19

Í stk. 1 er ásett, at útreiðslurnar hjá Fjarskiftiseftirlitinum av umsiting sambært lógini verða bornar av umsitarunum, sum hava fingið loyvi til at umsita økisnøvn. Um fleiri umsitarar eru, verða útreiðslurnar sambært stk. 2 býttar millum umsitararnar út frá marknaðarparti í álmanakkaárinum frammanundan.

Til § 20

Við ásetingini verður heimilað landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um, at skrivligt samskifti við myndugleikan skal vera elektroniskt, og kann áseta reglur um, at elektroniska samskiftið skal vera trygt.

Myndugleiki er í hesum føri Fjarskiftiseftirlitið og aðrir myndugleikar, sum samskifta skrivliga um viðurskifti, sum eru fevnd av lógini.

Uppskotið hevur við sær, at heimild er hjá landsstýrismanninum at áseta reglur um, at upplýsingar, skjøl o.tíl., sum viðvíkja viðurskiftum, ið eru fevnd av lógini ella reglum, ásettar við heimild í lógini, ikki verða mett at vera móttikin á rættan hátt, um upplýsingarnar ella skjølini eru latin myndugleikanum á annan hátt enn fyrisetta elektroniska háttin. Um upplýsingar o.tíl. verða send einum myndugleika á annan hátt enn eftir fyrisetta elektroniska háttinum, t.d. við brævi, skal myndugleikin, sbrt. vegleiðingarskylduni í fyrisitingarlógarinnar § 7, vegleiða um galdandi reglur, heruppií eisini um skylduna at samskifta eftir fyrisetta elektroniska háttinum. Meira nágreiniligar reglur verða ásettar í kunngerðini, heruppií hvussu samskift verður, hvørji viðurskifti eru fevnd, og hvør er fevndur av skylduni at samskifta elektroniskt. Eisini kann landsstýrismaðurin áseta reglur um, at samskiftið skal vera trygt. Hetta merkir, at samskiftið skal vera bronglað.

Sambært stk. 2 kunnu í kunngerðini ásetast neyv krøv um, hvørjar kt-skipanir skulu nýtast, eins og ásetast kunnu krøv um talgilda undirskrift o.tíl.

Í stk. 3 er ásett, at eini elektronisk boð verða mett at vera komin fram, tá tey eru atkomulig fyri móttakaran av boðunum. Hetta merkir, at upplýsingar o.tíl. til ella frá myndugleikunum, sum verða send samsvarandi fyrisetta elektroniska háttinum, verða mett at vera komin fram til móttakaran í teirri løtu, sum tilfarið er tøkt hjá móttakaranum í elektroniskum formi. Í hesum liggur, at elektroniska móttøkan hevur sama rættarvirknað sum vanligur postur, ið

verður mettur at vera komin fram til móttakaran, tá ið viðkomandi fráboðan ella tílíkt er løgd í postkassan hjá móttakaranum.

Til § 21
Fjarskiftiseftirlitið kann áleggja umsitara tvingsilsbøtur fyri at tvinga ígjøgnum gerðir ella undanlát sambært § 9, § 10 og § 14, stk. 1 og 2, sum áliggja umsitara.

Ásetingina um tvingsilsbøtur kann Fjarskiftiseftirlitið nýta til at áleggja umsitara at fylgja avgerðunum hjá eftirlitinum. Í metingini, hvørt ásetingin skal nýtast, skulu atlit verða tikin til til endamálið við tvingsilsbótum sæð í mun til slagið av broti, heruppií týdningin av brotinum í mun til integritet og støðufesti í umsitingini av økisnøvnum, sum eru tillutað Føroyum. Tað skal vera proportionalt.

Tvingsilsbøtur kunnu bert verða nýttar, tá tað frammanundan er tikin ein avgerð um at áleggja viðkomandi at fáa viðurskiftini í rættlag, og at umsitari ikki innan hesa nærri ásettu freistina hevur roynt at fáa viðurskiftini í rættlag.

Tá støddin á tvingsilsbótum verður ásett eigur at verða tryggjað, at upphæddin ávirkar atferðina hjá umsitara.

Til § 22
Sambært ásetingini í stk. 1 kann Fjarskiftiseftirlitið taka aftur eitt loyvi, um umsitari grovliga ella ferð eftir ferð fremur brot á lógina, reglur, settar í gildi við heimild í lógini, ella treytir í einum loyvi, sum er givið sambært lógini, ella virksemið hjá umsitara av øðrum orsøkum heldur uppat í loyvistíðini.

Áðrenn avgerð verður tikin um at taka aftur eitt loyvi skal ansast eftir, at avgerðin er proportional.

Brot á lógina ella treytir fevnir m.a. um ta støðu, har virksemið hjá umsitara av einari ella aðrari orsøk heldur uppat. Hetta kann eitt nú vera av fíggjarligu støðu umsitarans, t.d. húsagangi. Men talan kann eisini vera um aðrar støður, har umsitari heldur uppat, t.d. tí umsitari ikki hevur møguleika til at halda fram við umsitingini í samsvari við tær settu treytirnar. Eitt dømi kann vera, at tann breiða samansetingin av umboðum úr internetsamfelagnum ikki longur er til staðar, tí eitt ella fleiri feløg ikki longur vilja vera umboðað, uttan at umsitari á vanligan hátt, sum ásett í viðtøkunum, fær loyst hendan trupulleikan.

Sambært stk. 2 kann landsstýrismaðurin taka avgerð um, hvat skal henda við einum økisnavni, sum Fjarskiftiseftirlitið hevur tikið aftur. Landsstýrismaðurin hevur teir møguleikar, sum ásettir eru í § 3, t.e. at bjóða umsitingina út ella fyribils lata Fjarskiftiseftirlitið umsita økisnavnið, sbrt. § 3, stk. 2, nr. 4, inntil ein nýggjur umsitari er funnin.

Til § 23
Í stk. 1 verður skotið upp, at avgerðir, sum Fjarskiftiseftirlitið tekur sambært lógini, kunnu kærast til landsstýrismannin innan 4 vikur.

Sambært stk. 2 kunnu avgerðir, sum eru tiknar sambært § 3 og § 4 í lógini og reglum, ásettar við heimild í hesum ásetingum og sambært § 18, stk. 4, ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika. Harvið kann avgerð hjá landsstýrismanninum um, at eitt økisnavn skal bjóðast út ella ikki, sbrt. § 3, ikki kærast. Heldur ikki kann fyrireiking hjá Fjarskiftiseftirlitinum av einum útboði og avgerð um, hvør vinnur útboðið, sbrt. § 4, kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika. Avgerð hjá Fjarskiftiseftirlitinum eftir § 18, stk. 4 kann heldur ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika. Avgerðir eftir teimum í ásetingini nevndu ásetingunum kunnu bert leggjast fyri dómstólarnar eftir vanligu reglunum í rættargangslógini.

Til § 24
Sambært stk. 1 kemur lógin í gildi 1. juli 2021.

Í stk. 2 er ásett, at lógin, umframt handilstreytir og aðrar treytir sambært § 8 í lógini, eisini er galdandi fyri skrásetingar av økisnøvnum, sum eru gjørdar, áðrenn lógin kom í gildi. Tað merkir at bæði verandi og komandi skrásetarar verða fevndir av eins reglum. Hetta til tess at fáa eins reglur fyri skrásetarar av økisnøvnum, og harvið eina einfaldari umsiting av økinum.

Sambært stk. 3 fær ásetingin í § 13, stk. 2 um forboð fyri víðarisølu ella -útleigan ikki gildi fyrr enn tann 1. juli 2026 fyri økisnøvn, sum vóru skrásett, tá lógin kom í gildi.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 5. mars 2021

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Hoyringarsvar frá Dátueftirlitinum
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Fíggjarmálaráðnum
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá FO-ráðnum
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Føroya Tele
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá KT-felagnum
Fylgiskjal 6: Hoyringarsvar frá Felagnum Samskifti
Fylgiskjal 7: Hoyringarnotat